# Føroya Arbeiðsgevarafelag

## Ársfrágreiðing 2017

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**

Vinnuhúsið
Óðinshædd 7
Postboks 1038
FO-110 Tórshavn

# Frágreiðing frá nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag

Staðfestast kann, at tað framhaldandi er gongd í føroyska búskapinum, og at eftirspurningurin eftir vørum og tænastum frá føroysku vinnuni er stórur. Eisini á flestu útflutningsmarknaðunum gongur væl. Útflutningshagtølini tala fyri seg.

Arbeiðsloysið er 2,4%, og talið á løntakarum eru nú væl omanfyri 26.000, sum er hægri enn løntakaratalið í 2008. Hetta er gott, men tað er framvegis ein stór avbjóðing at fáa fatur á røttu arbeiðsmegini. Ikki bara handverkarum til handverksvinnuna og ferðavinnuna, men eisini til aðrar vinnugreinar. Tøkniligir førleikar yvirhøvur eru sera eftirspurdir, og tað er frá øllum vinnugreinum. Eisini framleiðsuvirkini mangla arbeiðsmegi.

Tilsamans vóru lønargjaldingarnar í 2017 góðar 480 mió. kr. hægri enn í 2016. Verður bert hugt eftir lønargjaldingunum frá vinnugreinum í 2017 í mun til 2016 sæst, at lønargjaldingarnar eru vaksnar við knøppum 400 mió. kr., meðan lønargjaldingarnar í almenna geiranum eru knappar 85 mió. kr. hægri í 2017 enn í 2016.

Verður hugt nærri eftir tølunum sæst, at vøksturin serliga er í byggi- og framleiðsluvinnuni, har lønargjaldingarnar eru øktar við 13,6%, næst kemur tænastuvinna við 6,3% og síðani fiskivinna við 4,4%.

Higartil í 2018 vísa hagtølini, at tað framvegis er vøkstur í lønargjaldingum, og eru 100 mió. kr. fleiri útgoldnar í lønum í mai mánaða í ár í mun til mai mánaða í 2016.

Samlaða feskfiskaveiðan hjá føroyskum fiskiskipum hevur aftur í 2017 verið stak vánalig, og rávørutilgongdin til føroysku fiskavirkini hevur av somu orsøk verið avmarkað. Fiskavirkini dúva tí uppá á innflutta rávøru.

Seinastu 10 árini hevur botnfiskiskapurin verið á støði við ringastu kreppuár fyrst í 90'unum, tá samfelagið var í svárari kreppu. Hetta hevur ført til, at Havstovan nú í fleiri ár á rað hevur mælt til at avmarka botnfiskiskapin, so stovnarnir hava møguleika at koma fyri seg aftur.

Hóast støðan framvegis ikki er broytt stórvegis, eru tó nakrir glottar at hóma. Í nýggjastu tilráðingini frá ICES verður víst á, at 2016 og 2017 árgangirnir av toski og hýsu eru yvir miðal, og tilráðingin um fiskiskapin eftir hesum fiskasløgum fyri 2019 hækkar í mun til tilráðingina í fjør. Tó lækkar tilráðingin fyri upsa.

So at siga allur tann uppisjóvarfiskur, sum føroysk skip fiska, verður landaður til føroysku uppisjóvarvirkini. Harumframt verður nakað landað frá útlendskum skipum, serliga svartkjaftur.

Føroysku skipini fiskaðu í 2017 væl meira av sild, nakað meira av makreli og eisini væl meira av svartkjafti í mun til árið fyri. Útlit eru til eina munandi lækking í avreiðingarvirðinum á uppisjóvarfiski í 2018, samanborið við 2017. Orsøkin er serliga minkandi nøgdir av makreli og sild, umframt útlit til nakað lægri prís fyri sildina.

Samlaði útflutningurin av fiskavørum øktist í 2017 við umleið 600 mió. kr., úr knøppum 7,7 mia. kr. í 2016 upp í umleið 8,3 mia. kr. í 2017. Av hesum var útflutningsvirði á aldum laksi umleið 3,9 mia. kr., meðan veiddur fiskur stóð fyri umleið 4,4 mia. kr.

Av tí veidda fiskinum var útflutningsvirðið á vanligu uppisjóvarfiskasløgunum makreli, sild, svartkjafti og lodnu knapt helvtin av útflutningsvirðinum á veidda fiskinum.

Framleiðslan í alivinnunu hevur gingið væl seinastu árini, og prísurin hevur verið høgur. Útlitini fyri 2017 vóru góð, og samlaða tøkan var 71.000 tons í kruvdari vekt. Um hugt verður eftir útflutningsvirðinum frá alivinnuni, er vøksturin frá 2015 til 2017 sera stórur, úr 2,8 mia. kr. til 3,9 mia. kr. Útflutninginum frá alivinnuni er nú knappliga helvtin av samlaða føroyska vøruútflutninginum og er laksur sostatt størsta einstaka útflutningsvøran. Væntandi minkar framleiðslan nakað í 2018 í mun til árið fyri.

Sum heild gongur tað væl lívfrøðiliga í alivinnuni, tó at onkur skýggj eru á hóma. Tilbuðir av BKD og hjartaklovningi (CMS) í laksi á føroyskum alibrúkum eru øktir aftur seinastu árini. Útbreiðslan og orsøkirnar til CMS í Føroyum verða nú kannaðar.

Laksalúsin er framvegis ein trupulleiki fyri føroyska aling, eins og hon er í laksaframleiðslu kring allan heimin, og eigur framvegis at verða tikin í størsta álvara. Lúsastøðan er tó higartil í ár frægari, enn hon hevur verið tey seinastu nógvu árini, samstundis sum heilivágsnýtslan er minkað í stórum. Alivinnan hevur gjørt og ger framvegis stórar íløgur fyri at koma trupulleikanum til lívs.

Stór ferð er á byggivinnuni, og hetta sæst væl aftur í hagtølunum. Avbjóðingin er manglandi arbeiðsmegi og tískil lønarglíðing, og var tað ikki

fyri møguleikanum at fáa útlendska arbeiðsmegi, hevði illa borið til.

Ferðavinnan veksur framhaldandi. Tal á gistingum eru øktar við umleið 10%, og alsamt fleiri bjóða seg fram at veita ferðafólki og føroyingum nýggjar og betri tænastur.

Handilsvinnan, sum er tann vinnugreinin har flest starvsfólk eru til arbeiðis, merkir eisini øktu ferðina á búskapinum, t.d. eru lønargjaldingarnar vaksnar við 5,2% frá 2016 til 2017.

Gleðiligt er at síggja, at eisini innan aðrar tænastuvinnur er vaksandi virksemi, og at lønargjaldingarnar í hesum vinnugreinum eisini vaksa.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur tó eina ávaring um búskapargongdina, og at komandi fíggjarlóg verður smíðjað til valárið 2019.

Seinastu árini vísa, at bæði land og kommunur føra ein konjukturviðgangandi fíggjarpolitikk. Skattainntøkurnar eru vaksnar nógv, og tað ger, at bæði íløgurnar og rakstrarútreiðslurnar eisini eru vaksnar nógv. Tað er ikki nakað nýtt, at bæði almennar íløgur og rakstur økist munandi eftir eina búskaparliga stagnatión. Hetta hava vit sæð fyrr, tá búskaparlig nos hava verið.

Búskaparráðið hevur ávarað ímóti hesum og víst á, at miðalvøksturin í almennu íløgunum, javn býtt millum land og kommunur, hevur verið 17% frá 2014-2018 í mun til 3,5% í vinnuni. Somuleiðis síggjast partar av øktu rakstrarútreiðslunum ikki aftur á fíggjarlógini, tí íløgur og kostnaður eru flutt út á grunnar og feløg, t.d. Bústaðir og hægri útgjøld úr almennu grunnum.

Úrslitini frá sáttmálasamráðingunum á almenna arbeiðsmarknaðinum fara sjálvsagt eisini at merkja raksturin hjá bæði landi og kommunum munandi komandi árini.

Demografisku broytingarnar, sum eru í væntu, fara at leggja eitt enn størri trýst á almennu útreiðslurnar innan heilsuverk og eldrarøkið, og einki sæst til, at stig verða tikin fyri at halda aftur við almennu nýtsluni til frama fyri hesa stóru avbjóðing.

Til heystar skal seinasta fíggjarlógin í hesum valskeiðnum til viðgerðar í løgtinginum. Megnar samgongan tá ikki at standa ímóti freistingini at ganga fleiri av ynskjum veljarans á møti, so kann væntast ein enn størri vøkstur í landskassans rakstri og íløgum í 2019 og frameftir.

## Arbeiðsmarknaður

Høvuðsendamálið hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er at arbeiða fyri góðum og varandi kørmum á arbeiðsmarknaðinum, bæði í mun til fakfeløgini, men eisini í mun til arbeiðsmarknaðarlóggávu. Í hesum eru sáttmálasamráðingarnar ein hin týdningingarmesta uppgávan hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Í ár endaði samráðingarrundan 2016 – 2018, og samráðingarrundan 2018 – 2020 byrjaði. Tað eru samráðingarnar við arbeiðarafeløgini, sum liggja fyrst í hvørjari samráðingarrundu, og sum sostatt leggja støðið undir restini av runduni. Tíbetur eydnaðist pørtunum í hesum samráðingunum at koma á mál uttan arbeiðssteðg.

Støðan á arbeiðsmarknaðinum – bæði privata og almenna – hevur annars verið ófriðarlig hesa seinastu tíðina. Vit hava sæð verkfall á almenna arbeiðsmarknaðinum, og á privata arbeiðsmarknaðinum hevur tvær reisur akkurát eydnast at koma á mál, eftir at semingsuppskot í fyrstu syftu varð havnað av fakfelagnum. Fasti Gerðarrættur hevur havt nógv mál til viðgerðar, og Semingsstovnurin hevur havt óvanliga nógv at gera.

Áralangar siðvenjur og mannagongdir tykjast ikki at verða virdar, og ivi verður sáddur um teir instansir, sum eru kring arbeiðsmarknaðin, m.a. Semingsstovnin.

Afturat hesum kemur, at politiska skipanin ikki í nóg stóran mun tekur arbeiðsmarknaðin við uppá ráð, tá broytingur verða gjørdar í lógar- og regluverkinum, sum hevur við arbeiðsmarknaðin at gera. Hetta hevur við sær, at broytingar verða gjørdar, sum skeikla arbeiðsmarknaðinum, og sum óumhugsað geva fyrimunir til aðra síðuna av arbeiðsmarknaðinum.

Vit hava sæð lógaruppskot, sum als ikki hava hingið saman í mun til, hvussu føroyski arbeiðsmarknaðurin er skipaður, men hóast hetta hava bara einstakir tinglimir undir viðgerðini givið yvirskipaða arbeiðsmarknaðinum gætur. Hetta merkir ikki, at ongar broytingar skulu gerast á arbeiðsmarknaðinum, men tær mugu gerast við skili. Onki at ivast í, at arbeiðsmarknaðurin skal fylgja við tíðini, men ikki bara onnur síðan av honum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag vísir á, at ein vælvirkandi arbeiðsmarknaður ikki er ein

sjálvfylgja, og at tað er týdningarmikið, at allir partar, sum varða av arbeiðsmarknaðinum, eru tilvitaðir um hetta.

## *Sjónarmið Føroya Arbeiðsgevarafelags*

Ein týdningarmikil uppgáva hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er at taka ábyrgd av teimum yvirskipaðu arbeiðsmarknaðar- og vinnupolitisku kørmunum, sum vinnan arbeiðir undir.

Fleiri nýskipanir hava verið á politisku dagsskránni seinasta ári, men nýskipan av almenna partinum av búskapinum er tó ikki til at fáa eyga á. Ferðavinnan verður nógv umrødd, og Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur at nú eiga vit at lofta møguleikanum og leggja lunnar undir eina burðardygga ferðavinnu, sum skapar arbeiðspláss og betri trivnað um alt landið.

Í undanfarnum ársfrágreiðingum frá Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur felagið m.a. tikið spurningarnar um fiskivinnunýskipan, marknaðaratgongd, skattapolitikk og arbeiðsmarknaðarpolitikk til viðgerðar.

Í hesi ársfrágreiðingini hevur Føroya Arbeiðsgevarafelag valt at seta ljósið á hesi trý mál:

- at vinnupolitikkurin má broytast,
- at vit mugu lofta møguleikanum í ferðavinnuni
- kappingarføri Føroya.

## Vinnupolitikkurin má broytast

Sum kanningin av “Kappingarføri Føroya” vísti, so er greitt, at vinnan heldur, at politiska og umsitingarliga umhvørvi í Føroyum er ov óstøðugt. Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at kappingarførið hjá Føroyum kann betrast enn meira við at dagføra landsins vinnupolitik. Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at hetta verður gjørt sum skjótast. Óhepna gongdin, har tað almenna útbyggir sítt virksemi, har vinnuligt virksemi longu er, má steðga ongantíð ov skjótt. Politisk stýring av ávísum vinnuvirksemi eigur eisini at steðga. Føroya Arbeiðsgevarafelag meinar, at dagføring av vinnupolitikkinum frá 2005 við støði í OECD-tilmælunum um best practice innan vinnupolitikk eigur at verða gjørd ongantíð ov skjótt, og at man framyvir tekur atlit til orðaða vinnupolitikkin í øllum teimum politisku avgerðunum, sum verða tiknar.

## Loftið møguleikanum í ferðavinnuni

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at nú er løtan til, at vit lofta møguleikunum, sum eru í ferðavinnuni, soleiðis at henda vinnan kann gerast enn ein súla undir búskapinum. Tað krevur, at land, kommunur, fyritøkur og fólk kring landið standa saman um at skipa karmarnar kring ferðavinnuna so væl sum gjørligt til gleði fyri okkum øll. Ítøkiliga er neyðugt at skipa so fyri, at tað ber betri til at skipa ferðavinnutilboð kring alt landið, men neyðugt er eisini við støðutakan til, hvussu handfaringin av gjøldum á ferðandi kann skipast soleiðis, at hesi gera gagn og ikki skaða.

## Kappingarføri Føroya

Fyri at bøta um langtíðarkappingarføri Føroya heldur Føroya Arbeiðsgevarafelag, at vinnan og politiska skipanin eiga at gera strategiskar langtíðarsemjur, herímillum um vinnupolitikk, og at økja um nýskapanina í landinum. Kanningin, sum felagið gjørdi av kappingarførinum hjá Føroyum, vísir greitt, at vinnan hevur tørv á størri stabiliteti frá politisku skipanini, og eru strategiskar semjur tískil einasti vegurin, um økjast skal um íløguhugin í vinnuni bæði í betri framleiðslu men eisini í nýskapan.

19. juni 2017

Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag

Bogi Jacobsen, formaður

# Innihaldsyvirlit

Frágreiðing frá nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag ........ 2
Hvat er nú at gera? Tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag ........ 9
Vinnupolitikkurin má broytast ........ 9
Loftið møguleikanum í ferðavinnuni! ........ 10
Føroyska kappingarførið styrkt munandi ........ 12
Mál í 2017 og 2018 ........ 14
Sáttmálasamráðingar 2017– 2018 ........ 16
Tiltøk 2017 ........ 18
Gongdin innan ymisku vinnugreinarnar ........ 21
Fiskivinna og fiskatilvirking ........ 21
Havbúnaður ........ 23
Handverksvinnan ........ 24
Shippingvinnan ........ 26
Oljuvinnan ........ 27
KT-vinnan ........ 27
Samskiftisvinnan ........ 28
Ráðgevaravinnan ........ 28
Handilsvinnan ........ 28
Ferðavinnan ........ 29
Ídnaðarvinnan ........ 30
Um Føroya Arbeiðsgevarafelag, Vinnuhúsið og feløgini annars ........ 31
Hvør húsast í Vinnuhúsinum? ........ 32
Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag ........ 33

# Inngangur

Føroya Arbeiðsgevarafelag umboðar flestu arbeiðsgevarar í landinum, og er virksemið hjá okkara limum sum heild grundarlagið undir samfelagnum.

Sum ein týdningarmikil spælari í føroyska samfelagnum átekur Føroya Arbeiðsgevarafelag sær leiklutin sum viðmerkjari og viðspælari í mun til, hvussu samfelagið Føroyar eigur at vera skipað.

Sjónarmið Føroya Arbeiðsgevarafelags verða á hvørjum ári staðfest í ársfrágreiðingini og annars so hvørt á heimasíðu felagsins www.industry.fo.

Í ársfrágreiðingunum undanfarin ár og í frágreiðingum frá felagnum annars eru eisini sjónarmið felagsins um allar tættir, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur hava týdning fyri føroysku vinnuna og samfelagið.

Hetta ger Føroya Arbeiðsgevarafelag ásannandi, at góðir karmar fyri vinnu og eitt burðardygt vinnulív eru nær tengd at gongdini í samfelagnum.

Í undanfarnum ársfrágreiðingum frá Føroya Arbeiðsgevarafelag, hevur felagið m.a. tikið spurningarnar um fiskivinnupolitikk, marknaðaratgongd, skattapolitikk og arbeiðsmarknaðarpolitikk til viðgerðar.

Í hesi ársfrágreiðingini fyri 2017 nýtir Føroya Arbeiðsgevarafelag høvi at koma við sínum sjónarmiðum um, hvørji viðurskifti tað eisini er tørvur á at vísa ans komandi tíðina. Hetta verður gjørt fyri at skapa kjak um loysnir fyri føroyska samfelagið, soleiðis at vit fáa eitt gott og sterkt grundarlag undir tí búskaparvøkstri, sum vit nú hava.

Tað eru óivað onnur viðurskifti, sum høvdu verið týdningarmikil at tikið upp, men Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur í ár valt at seta sjóneykuna á hesi:

- Vinnupolitikkurin má broytast
- Vit mugu lofta møguleikunum í ferðvinnuni
- Kappingarføri Føroya

# Hvat er nú at gera? Tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag

## *Vinnupolitikkurin má broytast*

### Týdningurin av røttum vinnupolitikki kann ikki yvirmetast

Týdningurin av førda vinnupolitikkinum í Føroyum kann ikki yvirmetast. Vit hava í Føroyum sæð dømi um bæði vánaligan og góðan vinnupolitiikk, og úrslitið er sum dagur og nátt. Við vánaligum vinnupolitikki koyrdu vit landið á heysin, við stórari fólkafráflyting sum úrsliti. Við góðum vinnupolitikki rættaðu vit skútuna upp aftur og løgdu lunnar undir ta framgongd, vit síggja í dag, har samfelagið gerst ríkari, og fólkatalið veksur.

Tær royndirnar, vit sum tjóð hava av skiftandi vinnupolitikki, gera tað so umráðandi at gera vart við seg, tá vit síggja, at vinnupolitiska kósin er skeiv. Tó at vit seinastu árini eisini hava sæð dømi um góð vinnupolitisk átøk, eru tó ov nógv dømi um, at vit vinnupolitiskt eru farin púrasta av tí kósini, sum varð sett aftaná kreppuna í nítíárunum.

### Vinnupolitikkur brúktur skeivt

Ein gagnligur vinnupolitikkur snýr seg um, hvussu vit leggja umstøðurnar til rættis, fyri at vinnan kann framleiða størst møguligt virði fyri føroyska samfelagið. Ein fyrsta fortreyt fyri, at nøkur virði eru at fordeila, er, at virðini yvirhøvur verða skapt av fyrstan tíð. Tíverri tykist tað, sum vit í staðin eru byrjaði at brúka sjálvan vinnupolitikkin sum fordeilingsamboð.

Dømi um hetta eru sonevndu menningarkvoturnar, sum verða útlutaðar sum hjálp til ávísar partar av landinum. Eitt annað feskt dømi eru ásetingarnar í alilógini, sum regulera, hvar í landinum fyritøkur skulu plasera síni virki og sítt virksemi. Slík ynski um politiska stýring av vinnuligum virksemi og arbeiðsplássum minna ikki sørt um tann førda politikkin, sum førdi okkum á ørmundarhús í 90'ununum. Og hesin politikkur er framvegis í dag líka skaðiligur fyri samfelagið, sum hann var tá.

Sambært OECD er besti vinnupolitikkurin
(1) at lata kapital og arbeiðsmegi verða brúkt har, tey skapa størst møguligt avkast, og
(2) at stuðlað verður undir menning av produktivitetinum hjá einstaka starvsfólkinum og einstøku fyritøkuni, serliga gjøgnum betri gagnnýtslu av KT, menning av innovatión og betraðar leiðslu og arbeiðsgongdir.

Til tað seinna hava vit sæð, at fleiri góðar verkætlanir eru settar í gongd (eitt nú Talgildu Føroyar og útbyggingar av samskiftisnetinum), meðan gongdin hevur verið meira neilig til tað fyrra punktið.

Politisku ynskini um at gera eina rímuliga fordeiling av teimum virðum, sum verða skapt, eiga ikki at føra til ein øðrvísi vinnupolitikk. Í staðin eigur tað at vera ein burðardyggur skatta- og avgjaldspolitikkur, sum verður brúktur at fordeila virðini millum borgararnar í samfelagnum. Fordeilingspolitikkur skal ikki førast við at forða vinnufyritøkum í at taka rationellar avgerðir fyri sína framleiðslu.

Vinnupolitiska uppgávan hjá tí almenna er sostatt partvíst at taka burtur forðingar fyri, at kapitalur og arbeiðsmegi verður brúkt har hesir skapa størst møguligt avkast. Ofta er besti mátin bara at lata marknaðin fáa frið, og so heldur dúva uppá generellar reguleringar, sum tryggja okkum móti ótilætlaðum avleiðingum. Eitt nú at vit fara væl við okkara umhvørvi, og at kappingin er jøvn og effektiv.

### Óheppin gongd

Seinastu árini hava vit sæð fleiri dømi um, at almennar fyritøkur og stovnar fara inn á øki, sum vanliga verða hildin at liggja best í privatu vinnuni. Tá eigarin ikki er privatur, er ikki sama krav til avkast sum í einari privatari fyritøku, og órentabult virksemi kann tí halda fram í longri tíð. Tað er tí umráðandi, at tað almenna áhaldandi tryggjar sær, at almennu partafeløgini og stovnarnir halda seg til sínar kjarnuuppgávur, og ikki breiða seg út á øki, sum meira effektivt verða loyst av tí privata. Um tað ikki er nóg áhugavert at fáast við tað virksemi, sum almenna partafelagið ella stovnurin varð settur at røkja, er tíðin kanska komin at steðga virkseminum ella at selja fyritøkuna.

Dømi um, at tað almenna fer inn á øki, sum tað privata meira effektivt kann taka sær av, er tunnilsliðið, sum tað almenna hevur sett á stovn. Har hevur tað almenna síðani nítiárini arbeitt eftir einum leisti, har tað almenna hevur fyrireikað verkætlanina, og prosjektering og bygging er síðani bjóðað út millum privatar fyritøkur. Hetta er nú broytt við, at tað almenna fer aftur til gamla

mátan at byggja tunnlar, har almenn tunnilssjakk skulu arbeiða seg spakuliga frameftir.

Eisini hava vit sæð fleiri dømi um, at almenn partafeløg og grunnar fara inn á privatar marknaðir, tá virksemið á kjarnuøkinum minkar ella verður minni áhugavert.

Samstundis arbeiðir landsstýrið við at útvega heimild frá løgtinginum til at selja Posta.

Samanumtikið kann sigast, at vinnupolitikkurin peikar í allar ættir.

## Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til:

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til at:

- Tað almenna skal halda seg vekk frá marknaðum har privatur kapitalur longu er virkin.
- Tað almenna setir sær fyri at dagføra vinnupolitikkin frá 2005 við støði í OECD-tilmælunum um best practice innan vinnupolitikk.
- Atlit verða tikin til orðaða vinnupolitikkin í øllum teimum politisku avgerðunum, sum verða tiknar.

# *Loftið møguleikanum í ferðavinnuni!*

Er hon av tí góða ella av tí ringa? Við jøvnum millumbilum hoyra vit, at tað er framgongd ferðavinnuni, og vit síggja, at fleiri íløgur verða gjørdar í vinnuna. Hetta gleðir summi og ørkymlar onnur. Tað er møguligt, at vit ikki øll eru á einum máli um, hvønn leiklut ferðavinnan skal hava í Føroyum, men hvat vita vit veruliga um støðuna hjá ferðavinnuni í Føroyum í dag?

Sum á so nógvum øðrum økjum, eru hagtølini heldur fátækslig. Vit hava tó gistingarnæturnar at meta okkum eftir. Tær vísa ein vøkstur á tíggju prosent í mun til í fjør. Tað er ikki einki, men sæð í mun til onnur lond, hava Føroyar væl færri ferðafólk, og tá ið mongdirnar eru smáar, er tað avmarkað, hvussu nógv tíggju prosent muna. Í tali vóru gistingarnæturnar í fjør 190.000 íalt, um vit telja varisligu metingina av óskrásettu airbnb-gistingunum við. Vit hava ikki tey neyvu tølini, men tað verður mett, at 100.000 ferðafólk vóru í Føroyum í fjør. Spurningurin er, um tað er nógv ella lítið, og hvønn vit skulu samanbera okkum við. Um vit hyggja at øðrum oyggjum, sum vit ofta verða samanborin við, so vóru 650.000 ferðafólk á Bornholm, 1.250.000 á Orkney, og í Íslandi vóru í fjør 2.200.000 ferðafólk.

Ofta verður sipað til støðuna hjá ferðavinnuni í Íslandi, tá ið vísast skal á avbjóðingar í føroysku ferðavinnuni. Oftast sum ræðumynd, sjáldan sum sólksinssøga. Støðan í ferðavinnuni í Íslandi er so serstøk, at samanberingargrundarlagið er spinkult. Føroyar hava einki eldgos, sum setur okkum á heimskortið, soleiðis sum útbrotið í Eyðafjallajøkli gjørdi tað í 2010 í Íslandi, heldur ikki er flogvøllurin í Vágum miðdepil fyri yvirlandsflutningi av fólki, sum altjóða flogvøllurin í Keflavík er.

## Gylta løtan at lofta møguleikanum

Heldur enn at lata okkum ávirka av ræðumyndum úr øðrum londum, sum vit ikki kunnu samanbera okkum við, eiga vit at lofta tí møguleikanum, vit í hesu løtu hava at skipa okkara ferðavinnu so væl sum gjørligt og syrgja fyri framhaldandi at verða eitt stig frammanfyri og fegnast um, at vit hava tamarhald á ferðavinnuni í Føroyum og møguleika fyri at skipa hana, júst sum vit vilja. Vit eiga at seta okkum fyri at fáa sum mest burtur úr hesi vinnu, sum kann hava ágóðar við sær kring alt landið, um vilji er til tess. Land og kommunur, borgarar og vinna hava øll eina ábyrgd av, at hetta skal eydnast.

Í ferðavinnuni eru mangir møguleikarnir, sum kunnu skapa lív og trivnað í økjum, har virksemið annars hevur verið fjarandi í áravís. Í dag eru meira enn 600 størv tengd at ferðavinnuni, og boðað verður frá, at tørvur er og verður á fleiri starvsfólkum. Fyritøkur eru kring alt landið, sum burturav ella partvís eru tengdar at ferðavinnuni. Hesar fyritøkur bjóða tilboð, tænastur og upplivingar, sum eisini føroyingar kunnu njóta, og sum ríka trivnaðin her á landi.

Neyðugt er við einum ávísum ferðafólkatali, um grundarlag skal verða fyri at bjóða hesar tænastur. Um vit syrgja fyri at gagnnýta teir møguleikar, ið standast av hesi vinnu, og skipa hana skynsamt við tí endamálið, at hon millum føroyingar verður fatað sum ein ágóði, er eingin orsøk at óttast ein vøkstur í ferðavinnuni.

## Atlit skal takast til náttúruna

Vit eru øll eym um serstøku føroysku náttúruna og gáa verður eftir henni sum ongantíð áður, nú hildið verður, at ferðavinnan av álvara hevur tikið dik á seg. Myndugleikarnar hava tikið stig til at endurskoða lóggávuverkið á økinum, og væntandi verður ein náttúrufyrisiting sett á stovn at umsita hetta lógarverk. Náttúruvernd er av fremstu áhugamálum hjá ferðavinnuni, og ein kann spyrja seg sjálvan, hvar ferðavinnan hevði verið uttan fuglin í bjørgunum, vøkru fjøllini og reina havið. Uttan føroysku náttúruna var ferðavinnan í Føroyum lítið verd. Ferðafólkini, sum vitja Føroyar, eru eyðkend av at vera tilvitað um náttúruríkidømið og ynskja ikki at vera til ampa. Higartil hava tó ongar greiðar reglur verið at hildið seg til, og fólk í ferðavinnuni hava tí brúkt vanligt vit og skil og siðvenju. Nú reglur koma, eiga tær at vera sakliga og fakliga grundaðar og ikki minst beinraknar, soleiðis at tær ikki gerast óneyðuga víðfevndar. Samstundis er tað týdningarmikið, at vinnan verður tikin við upp á ráð, meðan hetta arbeiðið verður gjørt.

## Tilboð og vørumenning heldur enn innkrevjing av gjøldum

Nú ferðavinnan er í vøkstri, er freistandi at taka inn gjøld við kassa eitt uttan at bjóða nakað afturfyri. Seinasta árið hava ymisk hagastýri og bóndir boðað frá, at gjøld verða tikin. Tess fleiri ymisk gjøld og ymiskar skipanir verða galdandi kring landið, tess torførari og ólagaligari verður tað hjá ferðasmiðjunum at selja túrar kring oyggjarnar, og málið um at spjaða ferðafólk kring landið gerst torførari at røkka. Skal gjald takast, er neyðugt, at talan er um eina skipan og eitt gjald, sum er galdandi fyri alt landið.

Samstundis hevur verið á lofti, at Samferðslumálaráðið arbeiðir við at hækka ferðaseðlaprísirnar hjá Strandfaraskipum Landsins fyri útlendingar. Hetta gongur eisini beint í móti at senda ferðafólk út um landið. Ein snøggari loysn vildi verið at gjørt avsláttarskipanir við einum munandi fyrimuni til tey fastbúgvandi, soleiðis at munurin á viðskiftafólki ikki gjørdist so sjónligur.

Tað er týdningarmikið, at ferðavinnupolitikkurin hjá landinum peikar ein veg og ikki í nógvar ymsar ættir. Annaðhvørt er ynskið, at ferðafólkini skulu spjaðast kring landið, soleiðis at so nógv øki í landinum sum gjørligt kenna ágóðarnar av ferðavinnuni við øktum vøkstri, fleiri starvsmøguleikum, øktum virksemi og fleiri tænastuveitingum, ella falla vit fyri freistingini at hækka prísirnir og leggja gjøld á, soleiðis at vit fáa so nógvan pening sum gjørligt burturúr hvørjum einstakum ferðandi og harvið missa kappingarførið.

## Lokala avkastið

Myndugleikarnir eiga at stimbra menningina av vørum og tænastum kring landið. Heldur enn at taka gjøld eiga vit at hava tilboð at bjóða ferðafólkunum, sum vit kunnu taka pening fyri. Stundum verður nevnt, at tað er torført at fáa fígging til íløgur, ið liggja í útjaðaranum, samstundis sum tað er har, at størsti tørvurin er á tilboðum at bjóða ferðafólkunum. Tað er møguligt, at ein vinnuframaskipan hevði hjálpt upp á hesa støðu.

Tað er munur á, hvussu ymisk øki megna ferðavinnuna. Nólsoy er eitt dømi um eitt øki, har nýggj hugskot og átøk spretta og festa røtur til frama fyri trivnað og fjøltáttað virksemið í oynni. Nólsoyingar hava loftað møguleikanum og gjørt vinnuveg burtur úr ferðavinnuni. Hinvegin er Mykines eitt væl umtókt ferðamál í Føroyum, har íbúgvarnir eru ørkymlaðir av, at avkastið av ferðavinnuni ikki sæst aftur lokalt, av lutfallinum millum ferðafólk og tal av íbúgvum í oynni, og av hvat árin hetta hevur á bygda-, náttúru- og djóralív í oynni. Hetta eru avbjóðingar, ið skulu takast í álvara, og tiltøk eiga at verða sett í verk, sum tryggja, at tað er liviligt fyri tey, sum búgva í økjum sum hesum.

Ferðavinnan eigur at verða ein ágóði fyri okkum øll, og verður rætt farið fram, kann hon gerast ein týðandi súla undir føroyska búskapinum. Ferðavinnan, sum hevur tað sereyðkenni, at hon hevur øðrvísi búskaparlig sveiggj enn eitt nú fiski- og alivinnan. Søguliga hava Føroyar einamest verið tengdar at fiskivinnuni, og grundarlagið undir føroyska búskapinum er framvegis viðbrekið. Tí hava vit sum samfelag skyldu til at stuðla undir aðrar vinnur, sum kunnu geva eitt munagott íkast til búskapin og vera við til at tryggja búskaparligt støðufesti í Føroyum.

## Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til:

- at land, kommunur, fyritøkur og fólk kring landið lofta møguleikanum og skipa karmarnar kring ferðavinnuna so væl sum gjørligt til gleði fyri okkum øll
- at betra um fíggingarmøguleikar til íløgur í ferðavinnutilboð í útjaðaranum við t.d. at skipa tíðaravmarkaðar vinnuframaskipanir til endamálið

- at ítøkilig tænasta fylgir við, har gjøld verða ásett, soleiðis at tað er ein samanhangur millum gjald og tænastu
- at gera avsláttarskipanir fyri tey fastbúgvandi heldur enn at gera mismun á viðskiftafólki, hetta eisini fyri at náa endamálinum um at spjaða ferðafólkini betri um landið

## Føroyska kappingarførið styrkt munandi

Føroya Arbeiðsgevarafelag gjørdi í 2017 eina kanning av kappingarførinum hjá Føroyum sum tjóð eftir leisti frá World Economic Forum (WEF), sum ger hesa kanning millum 138 ymisk lond.

Endamálið við kanningini er at geva politikarum og føroyska vinnulívinum møguleika at síggja, hvussu kappingarfør vit eru sum land, samanborið við okkara kappingarneytar og umheimin, umframt at fáa vitan um, hvar vit hava møguleikar at betra um langtíðar kappingarførið.

Hóast heimsbúskaparliga gongdin seinnu árini er stagnerað, er føroyski búskapurin í støðugari framgongd; vit hava methøgan fólkavøkstur, vaksandi samband og samhandil við umheimin, vaksandi eftirspurning og útboð av hægri lesnaði, lágt arbeiðsloysi og lágan prísvøkstur.

Samstundis er føroyska kappingarførið styrkt munandi, síðan kanningin varð gjørd á fyrsta sinni í 2009. Føroyar liggja í 2017 á einum 38. plássið samanborið við øll heimsins lond, í mun til, at vit lógu vit á einum 79. plássið í 2009.

Føroyar verða roknaðar sum ein nýskaparrikin tjóð sambært WEF, grundað á okkara høga BTÚ. Tað merkir, at langtíðar kappingarførið er treytað av nýhugsan og nýskapan. Tað merkir eisini, at tað verður tikið fyri givið, at grunnleggjandi viðurskifti, ið snúgva seg um almennar og privatar stovnar, infrakervi, makrobúskap, fólkaskúla og heilsu, eru nøktandi. Samstundis verður tað í kanningini sett hægri krøv til, at vinnan er framkomin og nýskapandi, sum drívmegi fyri langtíðar kappingarførið.

Úrslitini frá kanningini vísa, at vinnan heldur, at av teimum 16 størstu forðingunum fyri betri kappingarføri fyri føroysku vinnuna eru tað hesi fýra, sum vinnan metir hava størst týdning at gera nakað við:

- óstabilitetur í politiska umhvørvinum
- tung almenn umsiting
- atgongd til fígging
- ov lágur kapasitetur til nýskapan

## Yvirhøvur eitt trygt og gott land at reka vinnu

Yvirhøvur eru Føroyar eitt trygt land at liva og reka vinnu í; her er nærum einki mutur, tjóvarí ella hóttan um yvirgang, og er hetta ein kappingarfyrimunur í mun til at varðveita og tiltrekkja kapital og teir røttu førleikarnar. Harumframt metur vinnan, at arbeiðsmoralurin er góður í arbeiðsstyrkjuni, og er hetta ein góð fortreyt fyri, at starvsfólk eru áhugað at arbeiða við nýhugsan og nýskapan.

Tað er tó órógvandi, at føroyskar fyritøkur eru sannførdar um, at sera stórur óstabilitetur er í politiska umhvørvinum. Hetta eigur at verða gjørt nakað við í langtíðar vinnupolitiskum semjum.

Somuleiðis metir vinnan, at inntøkuskattastigið og sosialar veitingar gera arbeiðsmarknaðin minni áhugaverdan fyri arbeiðstakarar. Harumframt arbeiða lutfalsliga nógvir føroyingar uttanlands og búgva í Føroyum, og kann tað hugsast at vera orsakað av, at vanligi føroyski inntøkuskatturin er ov høgur og sostatt ikki kappingarførur. Vantandi skattainntøkur frá føroyingum, ið arbeiða uttanlands, ger tað helst fíggjarliga meira trupult hjá politisku skipanini at fíggja samfelagið og somuleiðis gera íløgur í nýskapan.

Útboðið av hægri útbúgvingum er vaksið munandi síðan 2009, tó metir vinnan ikki, at føroyska skúlaverkið í nóg stóran mun nøktar tørvin hjá vinnuni, umframt at eftirútbúgvingar ikki í nóg stóran mun eru tøkar í Føroyum.

Hinvegin vísur kanningin, at lønin hjá løntakarum ikki avspeglar og fylgir framleidni nóg væl, umframt at starvsfólk ikki hava nóg stórt rásarúm, soleiðis at tey verða eggjað til nýskapan. Hetta kann vera ein forðing í mun til at varðveita og tiltrekkja talent.

Tað er lutfalsliga lætt at reka vinnu í Føroyum, og hava vit samanborið við hini Norðurlondini lágan partafelagsskatt, umframt einfaldar skattareglur. Hóast hetta metir vinnan, at inntøkuskattastigið er ov høgt, og er hetta ein tann størsta forðingin

fyri at tiltrekkja førleikar og fyri vinnuliga framgongd.

Tað er lætt, skjótt og bíligt at seta fyritøku á stovn í Føroyum. Harumframt er gott infrakervi, lágur tollur á innfluttum vørum, lutfalsliga fáar fyritøkur og lítil kapping á føroyska marknaðinum. Tað er sostatt lutfalsliga lætt hjá fyritøkum og íleggjarum at koma inn á føroyska marknaðin. Tó so, vinnan metir, at krøv um loyvi, ásetingar, fráboðanir og mannagongdir í sambandi við inn- og útflutning eru forðingar fyri føroyskar fyritøkur, ið útflyta úr Føroyum og útlendskar fyritøkur, ið innflyta til Føroyar.

Við nýggjastu tøknuni eru góðir møguleikar fyri nýhugsan og nýskapan. Føroyskar fyritøkur eru væl fyri, tá tað snýr seg um tøkniligan førimun; nýggjasta tøknin er tøk, og fyritøkurnar duga væl at taka tøknina til sín. Nýggj tøkni hevur ofta nýskapan við sær. Tó metur vinnan seg ikki hava nóg stóra orku til nýskapan, og ger tað, at tær kanska ikki fáa sum mest burturúr møguleikunum at styrkja kappingarførið.

Hinvegin bendir kanningin á, at føroyskar fyritøkur í stóran mun eru dugnaligar til at taka í nýtslu nýggja tøkni. Tá liggur størsti fíggjarligi váðin hjá teimum útlendsku nýskapandi fyritøkunum, og sleppa føroyskar fyritøkur undan kostnaðarmiklum íløgum í nýhugsan. Vandin við hesum er, at ræðið á menningini liggur í fremmandum hondum, og gerast útlitini fyri langtíðar kappingarførið sostatt óviss.

## Savna okkum um tað, vit fáa gjørt nakað við

World Economic Forum tekur ikki hædd fyri marknaðarstødd á teimum londunum, ið eru við í kanningini. Støddin á føroyska heimamarknaðinum og útflutningsmarknaðinum trekkja sostatt samlaða føroyska kappingarførið niður. Av tí at vit ikki hava stórvegis ávirkan á hesi økini, er umráðandi, at vit savna okkum um tey øki, vit hava ávirkan á, fyri at gera tað meira freistandi at starvast og gera íløgur í Føroyum og soleiðis styrkja langtíðar kappingarførið.

## Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til:

Fyri at bøta um tær forðingarnar, sum føroyska vinnan sær sum tær størstu fyri at fáa betra um langtíðarkappingarføri, hevur Føroya Arbeiðsgevarafelag hesi tilmæli til ávíkavist vinnuna og politisku skipanina:

### Til vinnuna

- At gangnýta teir møguleikar, sum eru fyri eftirútbúgving av starvsfólki, og taka stig at betra um útboðið av eftirútbúgving har tey mangla
- At raðfesta og gera ætlanir fyri at økja um nýskapanina í fyritøkunum

### Til politisku skipanina

- Neyðugt er, at politiska skipanin ger strategiskar langtíðarsemjur, sum røkka tvørturum valskeið. Hetta er t.d. vinnupolitikkir og vinnugreinapolitikkir, sum seta út í kortið
- Tættari samstarv og samspæl millum vinnuna, politisku skipanina og granskingarstovnar við tí fyri eyga at at økja um áhugan fyri nýskapan og effektivisering

# Mál í 2017 og 2018

Í hesum partinum av ársfrágreiðingini verða nevnd yvirskipað mál frá farna ári, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur verið partur av, og sum eru umráðandi fyri vinnuna.

Umframt tey mál, sum eru nevnd niðanfyri, geva Føroya Arbeiðsgevarafelag og hini feløgini í Vinnuhúsinum hoyringssvar í sambandi við nýggjar lógir, kunngerðir, vegleiðingar v.m., sum koma frá politisku skipanini. Til ber at lesa øll hesi hoyringssvar á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum www.industry.fo.

Javnan verður skipað fyri kunningartiltøkum um evni, sum eru viðkomandi fyri limir okkara. Hetta verður gjørt við sokallaðum heimleiðistiltøkum, sum verða fyriskipað seinnapartar nakrar ferðir um árið.

- Føroya Arbeiðsgevarafelag og arbeiðarafeløgini tóku í 2016 stig til at fáa til vega undirvísingartilfar um føroyska arbeiðsmarknaðin. Feløgini settu seg í samband við Nám um at gera tilfarið, sum er skrivað av Helga Abrahamsen. Tilfarið er sum útgangsstøði ætlað til undirvísingina í samfelagsfrøði á miðnám. Hann hevur lagt stóran dent á at skriva tilfarið soleiðis, at tað er lætt at skilja. Av somu orsøk kunnu summir partar eisini verða brúktir í hádeild fólkaskúlans. Føroya Arbeiðsgevarafelag fegnast um sBókina, sum er ógvuliga væl úr hondum greidd, og felagið fegnast um, at tað nú er undirvísingartilfar um føroyska arbeiðsmarknaðin tøkt til skúlarnar at nýta. *Arbeiðsmarknaðurin* er ókeypis sBók, og er at finna á heimasíðuni hjá Nám.
- Fiskivinnunýskipanin hevur fingið sera drúgva umrøðu seinastu tvey árini, og í fjør var lógin um sjófeingi samtykt. Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur í tilgongdini gjørt yvirskipaðar viðmerkingar til lógaruppskotið og hevur latið vinnugreinafeløgini í fiskivinnuni um ítøkiligar viðmerkingar. Síðani hevur fylgilóggáva verið til hoyringar, men trupult hevur verið at fingið politiskar semjur um hesi. M.a. lógin um veiðugjald kom ikki aftur úr Vinnunevnd Løgtingsins, áðrenn farið varð í summarferiu í ár.
- Alilóggávan er eisini broytt. Landsstýrismaðuriní alimálum legði uppskot fyri Løgtingið við fleiri broytingum. Fyrisitingarliga prinsippið "ein alari ein fjørdur" varð upprunaliga innført fyri at minka um vandan fyri sjúku í alvinnuni. Við nýggju alilógini er hetta nú broytt nakað, so tað m.a. er lættari at geva møguleika til aling av skeljum og tara. Somuleiðis er eisini áseting um treytir í sambandi við aling í Suðuroynni, har krav nú er um. at alifiskurin eisini skal virkast har.
- Uppskot til lóg um Búskapargrunn Føroya var til hoyringar fyrst í árinum. Ásetingin í lógini, um hvørjar inntøkur kunnu setast í Búskapargrunnin, varð víðkað soleiðis, at tilfeingis og loyvisgjøld frá fiski- og alivinnuni eisini skulu í grunnin. Útgjaldsrelgurnar til landskassan vórðu eisini broyttar. Føroya Arbeiðsgevarafelag hevði umfatandi viðmerkingar til uppskotið, m.a. at gott er at tilfeingis- og loyvisgjøld verða løgd í grunnin, men vísti samstundis á, at á útgjaldssíðuni átti broytingar at verðið gjørdar soleiðis, at minni partur av inntøkunum kundu flytast í landskassan á hvørjum ári.
- Lóggáva í sambandi við pensjónsnýskipanina varð løgd fram á Løgtingið fyri jól. Í hesum sambandi fekk Føroya Arbeiðsgevarafelag høvi at koma á ein hoyringsfund, har Kristina Háfoss og Eyðgunn Samulesen, landsstýriskvinnur í ávíkavist fíggjar- og almannamálum løgdu fram. Føroya Arbeiðsgevarafelag gjørdi umfatandi viðmerkingar til lógaruppskotini, og tann broytingin, sum merkist best hjá arbeiðsgevarum, er hækkingin av inngjaldinum til Samhaldsfasta Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin á 0,75%, so gjaldið frá 1. januar 2018 verður 3% frá ávísavist arbeiðsgevara og arbeiðstakara.
- Føroya Arbeiðsgevarafelag fekk umboð í ein arbeiðsbólk, sum Heilsu- og Innlendismálaráðið seinasta vár setti at arbeiða við orkupolitikki. Samstundis setti Arbeiðsgevarafelagið ein innanhýsis vinnubólk, sum kundi sparra við umboðið í almenna arbeiðsbólkinum, umframt at gera eina innanhýsis frágreiðing til fíggjarliga partin av almennu frágreiðingini. Arbeiðsbólkurin er liðugur við fráleiðingina, men enn er henda ikki alment latin landsstýriskvinnuni.
- Mentamálaráðið hevur arbeitt við eini frágreiðing til landsstýriskvinnuna í Mentamálum um vaksnamannaútbúgving og

arbeiðsmarknaðardepil. Tá arbeiðsbólkurin var komin áleiðis við arbeiðnum, fekk Føroya Arbeiðsgevarafelag ein eygleiðara í ein fylgibólk til arbeiðið. Frágreiðingin er latin landsstýriskvinnuni.

- Mentamálaráðið hevur eisini arbeitt við eini frágreiðing um granskingarpolitikk. Føroya Arbeiðsgevarafelag hevði umboð í arbeiðsbólkinum. Arbeitt var í høvuðsheitum við at nútímansgera lógina um gransking og viðgera bygnaðin á granskingarøkinum. Frágreiðingin er latin landsstýriskvinnuni.
- Umfatandi lóggáva er galdandi fyri sjóvinnuna. Henda verður javnan dagførd og soleiðis eisini undanfarna ár. Her kunnu serliga verða nevndar kunngerð um luftdálking frá skipum og kunngerð um barlastarvatn. Eisini gjørdi ein arbeiðsbólkur undir Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum í 2017 ein yvirskipaðan sjóvinnupolitik fyri Føroyar. Umboð fyri Reiðarafelagið fyri Farmaskip luttók í bólkinum. Fyrsta ítøkiliga úrslitið av Sjóvinnupolitikkinum sæst longu, við tað at pengar eru settir av, til at Føroyar kunnu gerast partur av Paris MoU. Endamálið við Paris MoU er við skipaðum havnaeftirliti at sleppa av við undirmálsskip (substandard ships), og føroyskir myndugleikar verða sostatt partur av eini skipan, har atburður og góðska hjá skipum verða eftirhugt og tryggjað.
- Vinnufelagalóggávan er dagførd seinasta árið. Dagføringin var ein liður í regluligu dagføringini, sum er gjørd av hesum økinum nú í mong ár.
- Eisini innan fíggjarøkið hevur lóggáva verið til hoyringar. Fyri tað mesta er hetta dagføringar, soleiðis at føroyska relguverkið líkist ES regluverkinum.
- Uppskot um eigarapolitik landsins og landspartafeløg var til hoyringar í fjør. Uppskotini snúðu seg í stóran mun um at seta í verk umfatandi eftirlit og herða krøv til partafeløg, sum landið eigur meirilutan í. Politikkurin er nú settur í verk, eftir at endaligu frágreiðingarnar eru latnar landstýrinum.
- Í samband við Vinnudagin 2017 gjørdi Føroya Arbeiðsgevarafelag eina kanning av kappingarførinum hjá Føroyum sum tjóð. Kanningin varð gjørd eftir leisti frá World Economic Formum og var ein endurtøka av kanning, sum Vinnumálaráðið lat gera í 2009. Í kanningini var kappingarførið hjá Føroyum samanborið við 138 onnur av heimsins londum. Kanningin var gjørd við at seta út við 100 av teimum størstu føroysku fyritøkunum fleiri enn 100 ymsar spurningar. Úrslitið liggur á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum.
- KT-felagið hevur gjørt eina greining av, hvussu nógv KT-fólk arbeiða í Føroyum. Kanningin var ein liður í at sjónliggera tal á starvsfólki, sum arbeiða innan KT í vinnuni og tí almenna, við tí fyri eiga at samanbera við onnur lond og sostatt vita betur, hvør tørvur er á KT-fólki.
- Føroya Handverksmeistarafelag hevur seinastu árini sett fleiri átøk í verk við ti endamáli at varpa ljós á lærlingaøkið. Eitt nú hevur felagið staðið fyri útgávu av roknihefti til fólkaskúlan, skipa skúlavitjanir á byggiplássum og skipa fyri tiltøkum, har handverkarar greiða skúlanæmingum um sina yrkisleið sum handvekari. Í 2017 varð skipað fyri fyrsta FM fyri handverkslærlingar á Torginum í SMS. Kappast varð innan timbur, hárfríðkan og rørsmíð. Tiltakið var sera væl eydnað, og verður eftir ætlan aftur í 2019.
- Handilsvinnufelagið handaði í vetur Heilsu- og Innlendismálaráðnum eina loysn viðvíkjandi nýggjari pantskipan í Føroyum, har útgangsstøðið er, at sleppast skal av við øll endurnýtsluíløt allastaðni. Í loysnini verður mælt til at seta ein arbeiðsbólk at gera fyrireikandi arbeiðið við einum umboði úr Heilsu- og Innlendismálaráðnum, einum úr Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum og tveimum úr Handilsvinnufelagnum. Arbeiðsbólkurin er ikki settur enn.
- Menningardeild, sum skal skipa innlendis menningina av ferðavinnuni, er nú sett á stovn á Visit Faroe Islands. Hetta var høvuðstilmælið í Heildarætlanini fyri ferðavinnuna í Føroyum, sum varð handað landsstýrismanninum í Uttanríkis- og Vinnumálum 5. mai í fjør. Ferðavinnufelagið hevði eitt umboð í arbeiðsbólkinum, sum gjørdi heildarætlanina.

## Sáttmálasamráðingar 2017– 2018

Føroya Arbeiðsgevarafelag við undirfeløgum tess varðar av øllum sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum á landi umframt sáttmálunum fyri handilsskip.

Størsta sáttmálaøkið eru sáttmálarnir við tey fimm arbeiðarafeløgini, Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag. Samráðingarnar við hesi feløg eru tær fyrstu í hvørjari nýggjari samráðingarrundu, og leggja hesar støðið undir øllum sáttmálunum í runduni.

### Samráðingarrundan 2016-2018

Samráðingarrundan 2016 – 2018 endaði, tá Føroya Arbeiðsgevarafelag og Flogskiparafelag Føroya 1. mai 2018 skrivaðu undir sáttmála. Tá vóru tilsaman 39 sáttmálar undirskrivaðir síðan mai 2016. Karmurin í hesi runduni var 2,2 % fyrra árið og 2,3 % seinna árið.

### Samráðingar við YTF um Elektron

Týsdagin 30. mai gjørdu Føroya Arbeiðsgevarafelag og YTF (Yrkisfelag teirra, ið starvast í tryggingar-, fíggjar-, KT o.l. fyritøkum) semju um nýggjan sáttmála galdandi fyri Elektron.

Sáttmálin er galdandi í tvey ár, fram til 31. mai 2019. Partarnir samdust um eina lønarhækking á 2,2% 1. árið og 2,3% 2. árið umframt aðrar smávegis broytingar í sáttmálanum. Hetta er sama lønarhækking, sum fakfeløgini havi fingið í hesi samráðingarrundini, sum byrjaði 1. mai 2016.

### Sámráðingar við Føroysk Miðlafólk

Týsdagin 19. september skrivaðu Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroysk Miðlafólk undir nýggjan tvey ára sáttmála, fyri miðlafólk á privatu miðlunum.

Semjan ber við sær somu lønarhækkingar, sum hinar semjurnar, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur gjørt í samráðingarrundini 2016-2018. Hetta merkir, at 1. november hækkar lønin 2,2%, og 1. november 2017 hækkar lønin 2,3%.

### Samráðingar við Flogskiparafelag Føroya

Hin 1. mai 2019 kundu Føroya Arbeiðsgevarafelag og Flogskiparafelag Føroya skriva undir nýggjan 1-ára sáttmála.

Hetta hendi, eftir at vanligu samráðingarnar ikki bóru á mál, og semingsstovnurin tí kom uppí samráðingarnar.

Semjan, sum varð undirskrivað, var triðja semingsuppskotið, sum semingsmenninir løgdu fyri partarnar. Tey bæði fyrru vórðu vrakað av Flogskiparafelagnum.

Sáttmálin er galdandi frá 1. apríl 2018 til 31. mars 2019. Semjan hevði við sær eina lønarhækking á 2,3 %, umframt ávísar tillagingar í arbeiðsskipanini hjá flogmonnunum.

### Samráðingarrundan 2018 – 2020

Sáttmálarnir við tey fimm arbeiðarafeløgini gingu út 1. mai í ár. Tá samráðingarnar við hesi feløgini byrjaðu hin 19. mars, byrjaði samstundis nýggj samráðingarrunda fyri teir tilsaman 39 sáttmálarnar, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag varðar av.

Úrslitið av samráðingunum við arbeiðarafeløgini leggur støðið undir øllum samráðingunum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag í samráðingarrunduni 2018 – 2020. Hetta merkir ein karm fyri hækkingum á 3,26 % fyrra árið og 2,56 % seinna árið.

### Samráðingar við Arbeiðarafeløgini

Samráðingarnar um sáttmálarnar millum Føroyar Arbeiðsgevarafelag og ávikavist Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag byrjaðu 19. mars í ár. Sáttmálarnir gingu út 1. mai í ár.

Eftir at samráðingarnar undanfarin ár hava gingið væl, vóru samráðingarnar hesuferð tungar og kravdu langar og drúgvar samráðingarfundir, umframt at semingsstovnurin varð tilkallaður.

Vanligu samráðingarnar millum partarnar vardu í fyrstu syftu til 8. mai, tá semingsstovnurin varð tilkallaður. Semingsmaðurin Terje Sigurðsson metti tó, at partarnir ikki vóru komnir nóg langt í samráðingunum, og hann heitti tí á partarnar um at fara aftur til samráðingarborðið.

Partarnir samráddust so aftur til 11. mai, tá staðfest varð, at ikki komst longur í samráðingunum, og semingsstovnurin varð aftur tilkallaður.

Hesuferð longdi semingsmaðurin sáttmálan í eina viku, og fríggjakvøldið 18. mai legði hann semingsuppskot fyri partarnar.

Semingsuppskotið varð vrakað av arbeiðarafeløgunum, men eftir áhaldandi samráðingar varð nýtt uppskot, sum báðir partar góðtóku, lagt fram 19. mai.

Umframt tillagingar í sáttmálunum m.a. í sambandi við starvsaldur og matarsteðgir, hevur semjan við sær eina lønarhækking á 3,25 kr hin 1. mai 2018 og á 3,30 kr hin 1. mai 2019. Hækkingarnar svara til 3,26 % fyrra árið og 2,56 % seinna árið.

## Samráðingar við Maskinmeistarafelagið

Mikudagin 6. juni skrivaður Føroya Arbeiðsgevarafelag og Maskinmeistarafelagið undir nýggjan tvey ára sáttmála galdandi fyri maskinmeistarar á landi.

Semjan hevði við sær eina lønarhækking á 3,26% fyrra árið og 2,56% seinna árið, umframt aðrar smávegis tillaðingar í sáttmálanum. Semjan er sostatt á sama støði, sum semjan við arbeiðarafeløgini, sum varð gjørd í mai 2018.

## Komandi sáttmálasamráðingar

Sáttmálarnir, sum eftir eru at samráðast um í hesi samráðingarrunduni, ganga út sum víst niðanfyri.

| | |
|---|---|
| 1. oktober 2018 | Sáttmálin við Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna |
| 1. oktober 2018 | Sáttmálin við Atlantic Workers Union. |
| 1. november 2018 | Sáttmálin við Starvsmannafelagið fyri flogternur. |
| 1. januar 2019 | Sáttmálar við Starvsmannafelagið fyri starvsfólk á Føroya Tele og Posta. |
| 1. mars 2019 | Sáttmálarnir við Skipara- og Navigatørfelagið, Maskinmeistarafelagið og Fiskimannafelagið um manningar í handilsflotanum. |
| 1. apríl 2019 | Sáttmálin við Flogskiparafelag Føroya |
| 1. mai 2019 | Sáttmálin við S & K. |
| 1. mai 2019 | Sáttmálin við Grafiska Yrkisfelagið. |
| 1. mai 2019 | Sáttmálarnir við YTF og Finansforbundet. |
| 1. juni 2019 | Sáttmálin við YTF um Elektron |
| 1. november 2019 | Sáttmálin við Føroysk Miðlafólk. |
| **1. mai 2020** | **Sáttmálarnir við arbeiðarafeløgini ganga út - Nýggj samráðingarrunda byrjar** |
| 1. juni 2020 | Sáttmálin við Maksinmeistarafelagið fyri maskinmeistarar á landi |

# Tiltøk 2017

## Kunning og átøk

Í juni var kunningarfundur um stuðulsmøguleikar og um vinnu ph.d. skipanina. Hetta varð skipað saman við Granskingarráðnum, og í august mánaða legði Búskaparráðið fram heystfrágreiðing sína í Vinnuhúsinum.

Um ársskiftið hevði Vinnuhúsið ein bás á Jobmatch 2017. Hetta er afturvendandi tiltak, sum Vinnuhúsið hevur verði við til at fyriskipa, fyri at geva høvi til lesandi í Føroyum og uttanlands at koma í samband við føroyskt vinnulív.

Í januar varð skipað fyri einum kunningartiltakið um talgilding av rokningum, um hvussu fyritøkur skulu bera seg at í sambandi við, at krav nú er sett um, at allar rokningar skulu sendast tí almenna talgildar.

## Heimleiðistiltøk í Vinnuhúsinum

Føroya Arbeiðsgevarafelag og feløgini í Vinnuhúsinum skipað javnan fyri heimleiðistiltøkum, sum eru styttri tiltøk um viðkomandi evnir.

Í september mánaða varð skipað fyri tveimum heimleiðistiltøkum, Tað fyrra hevði heiti "Oljuríkt móðurgrýti eystanfyri Føroyar", og tað seinna var um samspæl millum praktiska vitan og bókliga vitan í føroysku fiskivinnuteiggjuni.

Eitt heimleiðistiltak var eisini í mai mánaða, har Føroya Arbeiðsgevarafelag skipaði fyri kunning fyri limum um nýggju ES-fyriskipanina um persónsdátuvernd.

## Vinnudagurin 2017

Hetta var 18. ferð, at skipað varð fyri Vinnudegnum. Tað er framvegis týdningarmikið at halda fast við henda eina dagin um árið, har føroysk vinna kann vera saman um hetta, sum onkur hevur kallað hátíðardagur vinnunar. Luttøkan var góð, og dagurin væleydnaður.

Veitslan á Vinnudegnum 2017 var eins og í 2016 hildin í sermerktu hølunum hjá Öström, har borðreitt varð við alskyns mati á ymsum básum, ið stóðu úti og inni. Gott høvi var tí hjá gestunum at heilsa uppá hvønn annan í einum óformligum umhvørvi. Samanumtikið kann sigast, at hesin hátturin at skipa veitsluna er sera væleydnaður.

Á Vinnudegnum vórðu sum vanligt Ársins Virki og Ársins Átak kosin.

## Smyril Line Ársins Virki 2017

Grundgevingin hjá dómsnevndini var hendan:

"Nú á døgum er tað týdningarmikið at flyta seg, verður sagt. Man má vera flytførur! Og tað eru vit so. Vit flyta okkum eftir størvum og útbúgvingartilboðum, bæði í Føroyum og uttanlands. Og tá vit so hava feriu, vilja vit helst brúka frítíðina á eksotiskum støðum. Hjá útlendingum kann tað verða í Føroyum, meðan tað hjá føroyingum eisini kann vera longri burturi. Vit flyta okkum saman við familjuni til tey feriustøð, sum tykjast mest spennandi.

Á sama hátt er flutningur ein týðandi lívlína hjá føroyska vinnulívinum. Vit hava stórar útflutningsfyritøkur, sum selja sínar vørur til fjarskotin lond, og sum tí mugu flyta vørurnar langa leið. Men so at siga allar føroyskar fyritøkur hava eisini tørv á at innflyta ymiskt til sítt virksemi. Gongur tú í dag ein keitúr, eru tað ikki bara konteynarar, øl og brennivín, og timbur, sum skipast inn, men eisini fullfermdir trailarar, stórar maskinur, tilfar og amboð. Og tað er ikki bara millum kl. 3 og 5, men allar tíðir á døgninum, allar dagar í vikuni.

Fyri at fáa hetta samfelagið at hanga saman, og fyri at geva fólki og fyritøkum tað, tey vilja hava, er neyðugt við flutningstænastum av góðari góðsku. Og er tað eitt øki, har Føroyar veruliga hava ment seg seinastu øldina, er tað júst her.

Tað er menningin í flutningstænastum, sum hevur gjørt tað møguligt hjá einari alifyritøku at selja ein laks á einum fiskamarknaði í New York 72 tímar eftir, at hann er tikin úr aliringinum. Somuleiðis er tað menningin av flutningstænastunum, sum hevur gjørt tað so nógv høgligari at fáa tann rætta eykalutin til maskinuna, ella hjá handilsvinnuni at fáa júst tann rætta fidgetspinnaran, sum børnini ynskja sær.

Tá so nógv er at flyta av bæði fólki og farmi, gevur tað eisini møguleikar fyri einum vinnuvegi hjá teimum, sum hava skil fyri logistikki. At gera seg galdandi á einum flutningsmarknaði við harðari kapping er tó lættari sagt enn gjørt. Tað krevur, at tú altíð

ert líka langt frammi í skónum, sum kappingarneytarnir eru.

Ársins Virki 2017 hevur fyrr roynt, hvussu torført tað kann vera at fáa raksturin at hanga saman, men hevur, við at tillaga og trimma virksemið, megnað at skapa eina sunna, væl rikna fyritøku. Felagið hevur ment søluna og marknaðarføringina hjá felagnum, og hevur bjóðað nýggjar tænastur fram, sum bæði hava økt um søluna og nøgdsemið hjá kundunum. Inntøkurnar hjá felagnum koma í dag í stóran mun frá kundum uttan fyri Føroyar, og eitt nú kann nevnast, at 80% av ferðafólkasøluni liggur uttan fyri Føroyar. Felagið hevur við hesum stóran týdning fyri føroysku ferðavinnuna.

Ársins Virki 2017 er ein týðandi føroyskur arbeiðsgevari, og tað munnu vera mong ung fólk, sum byrjaðu sítt arbeiðslív við at arbeiða eina summarferiu ella báðar tvær umborð á flaggskipinum hjá hesum flutningsfelagnum. Starvsfólkatalið er eftir fáum árum økt munandi, og í dag arbeiða eini 300 fólk í felagnum. Tað er møguligt, at frítíðin hjá teimum ferðandi byrjar umborð, men hjá starvsfólkunum, sum hvønn dag skulu tryggja, at kundarnir eru nøgdir, og at vøran kemur fram til tíðina, er talan um hart arbeiði.

Ársins Virki hevur torað at gjørt stórar íløgur í nýggj tól á einum marknaði, sum frammanundan er merktur av harðari kapping. Serliga eru íløgur gjørdar í trý farmaskip, so skipatalið er økt úr tí eina skipinum upp í fýra skip. Virksemið av farmaflutningi er nógv ment við nýggjum flutningsleiðum og tænastum, sum hava betrað munandi um flutningsmøguleikarnar og reglusemið til og úr Føroyum og Íslandi. Eisini er felagið farið í holt við hotellvirksemi, og hevur sum eina byrjan yvirtikið raksturin av frítíðardeplinum í Skálavík.

Felagið hevur megnað at økt um virksemið og um søluna á einum marknaði við harðari kapping, uttan at tað hevur ávirkað avkastið í felagnum negativt. Avkastið hevur sum heild verið hækkandi seinnu árini.

Við støði í menningini av felagnum og í góðu úrslitunum hjá felagnum, er dómsnevndin – sum tit ivaleyst longu hava gitt – samd um, at Ársins Virki 2017 er Smyril Line. Vit vilja tí fegin bjóða stjóranum í Smyril Line, Rúna V. Poulsen, oman at taka ímóti heiðrinum."

## Ársins Átak 2017 var Hiking

Í grundgeving síni segði dómsnevndin m.a.:

"Hvussu gongur?" "Tað man fara at ganga!" "Tað gekk upp." "Vit mugu ganga aðrar gøtur." "Dansurin gongur.". Uttan at vit geva okkum far um tað, hoyrist í okkara talu- og skriftmáli, at føroyingar søguliga sæð hava gingið, tá vit skuldu flyta okkum úr einum staði í annað. At ganga var nakað grundleggjandi í tilveruni hjá føroyingum. Bæði tá ørindi vóru í aðra bygd, og tá farast skuldi í hagan at mjólka neytunum, skera torv ella røkta seyðin.

Síðani komu vegirnir og bilarnir, og tað gjørdist høgligari at flyta seg úr einum staði í annað. Tó hildu summi, at vit mistu nakað týdningarmikið, tá vit fóru at ganga minni og koyra meira. Tá fyrsta føroyska landsvegaætlanin var til umrøðu í løgtinginum fyrst í 20. øld, helt onkur tingmaður, at hestavognur var ein óvirðiligur háttur hjá fólki at flyta seg. Betri var at ganga. Og kendi danski filosoffurin Søren Kierkegaard minti í brævi til sjúku systir sína á, hvussu gagnligt tað var at ganga:

"Miss fyri alt í verðini ikki hugin at ganga. Við at ganga hvønn dag, veit mær væl við, og eg gangi frá hvørjari sjúku. Eg havi við at ganga fingið mínar bestu tankar, og eg veit ikki um nakran tanka so tungan, at tú ikki kanst ganga frá honum. Tess meira tú situr í frið, tess meira útsaligur verður tú."

Í dag er neyvan nakar, sum kundi hugsað sær eina tilveru uttan vegir. Men samstundis eru tað nógv okkara, sum røra okkum ov lítið, og tá vit so royna at taka okkum saman, er tað kanska ein rennitúrur eftir fløtu vegunum ella eftir einum enn flatari rennibandi. Vit leita okkum bert sjáldan niðan í fjøllini, at skoða yvir sund og skarð.

Tá vit droyma, ella tá vit seta okkum mál, snýr tað seg tó ofta um at røkka tindunum. Sum eitt nú tá U-21 hondbóltslandsliðið hjá monnunum droymdi um at vinna seg upp í heimselituna, og ikki lat tað verða við dreymin, men bardi seg upp millum 16 tey bestu í heiminum. Hóast teir hesaferð ikki rukku heilt upp á ovasta tindin, var tað framvegis ovasti tindurin, sum var málið, ella í minsta lagi dreymurin hjá teimum.

Summi fólk taka tó hetta við at røkka tindunum meira bókstaviligt enn onnur, tá tey droyma. Vit hava m.a. ein bólk av fólki, sum hvørja fríløtu, tey hava, fara út at ganga í fjøllunum, og nøkur fá hava enntá longu verið uppi á øllum føroysku fjallatindunum. Nógv okkara minnast helst skotan Jamie Andrew, sum á

Vinnudegnum í 2010 greiddi fólki frá, hvussu hann misti bæði hendur og føtur, tá hann kom illa fyri í Alpunum. Meðan hann kom fyri seg aftur, hugsaði hann tó framvegis um, hvussu hann kundi sleppa upp aftur á tindarnar.

Tað kann vera ringt at greiða fólki frá, hví tað er so serligt at røkka einum fjallatindi. Tá fjallaklintrarin George Mallory av einum blaðmanni varð spurdur, hví hann tvíhelt um at fara upp á hægsta fjall í heiminum, segði hann: "Because it's there…" Hjá summum kann tað vera henda avbjóðingin, sum fjallið gevur tær, bara við at fjallið er til. Tú følir, at tú bara mást niðan á tindin.

Ársins Átak í ár er skapt av einum av hesum fólkum, sum hevur verið uppi á øllum teimum føroysku fjøllunum, og sum kennir føroysku fjøllini sum sín egna buksulumma. Hesin persónur hevur tó valt at deila síni upplivilsi við okkum øll, og meira týdningarmikið: at hjálpa og eggja okkum til sjálvi at uppliva føroysku fjøllini og náttúruna. Hann hevur saman við sínum samstarvsfeløgum nevniliga skapt eina heimasíðu, sum vísir okkum fleiri av teimum framúrskarandi túrum, sum vit kunnu ganga í hesum landi. Heimasíðan hjálpir teimum ókunnugu at finna rætta veg, við myndum og á einum talgildum korti. Til hjálp fyri bæði føroyingar og útlendsk ferðafólk. Fyri bæði roynd og óroynd.

Við ókeypis at lata okkum øll fáa ágóðan av hesum, hevur hann tó samstundis økt um áhugan fyri virkseminum hjá fyritøku sínari at bjóða fram tænastur sum ferðaleiðari. Hesin áhugi hevur verið so mikið stórur, at høvuðspersónurin handan síðuna hevur kunnað sagt sítt starv upp. Nú arbeiðir hann fulla tíð við síni egnu fyritøku og við tí, sum hann brennir mest fyri: at ganga í føroysku náttúruni og vísa føroyingum og útlendingum tey vakrastu, serligastu ella mest avbjóðandi støðini.

Dómsnevndin hevur í sínari grundgeving lagt dent á, at heimasíðan hevur nøktað ein stóran tørv, sum var á einari slíkari kunning, og at heimasíðan er væl frágingin. Í staðin fyri at síggja forðingarnar við øktari ferðavinnu, hevur hann, samstundis sum hann hjálpir og stýrir ferðafólkunum og soleiðis verjir náttúruna, eisini skapt ein vinnuveg úr hesum.

Ikki minst hevur Ársins Átak víst, at tað ber til at skapa nýggjar vinnumøguleikar og ein nýggjan dynamikk, um vitan verður felags, heldur enn at verða hildin tætt at kroppinum. Dómsnevndin er spent uppá at fylgja menningini av heimasíðuni, og fer í hesum sambandi at heita á fólkini handan Ársins Átak um at umhugsa at gera eina app til fartelefonir.

Dómsnevndin hevur í ár valt at geva heiðurin sum Ársins Átak til heimasíðuna hiking.fo og fyritøkuna handan heimasíðuna Sp/f Hiking, og vit vilja fegin bjóða Pól Sundskarð oman at taka ímóti heiðrinum."

# Gongdin innan ymisku vinnugreinarnar

## *Fiskivinna og fiskatilvirking*

### Fiskaútflutningur

Samlaði útflutningurin av fiskavørum øktist í 2017 við uml. 600 mió. kr., úr knøppum 7,7 mia. kr. í 2016 upp í uml. 8,3 mia. kr. í 2017. Av hesum var útflutningsvirði á aldum laksi umleið 3,9 mia. kr., meðan veiddur fiskur stóð fyri uml. 4,4 mia. kr.

Av tí veidda fiskinum var útflutningsvirðið á vanligu uppisjóvarfiskasløgunum makreli, sild, svartkjafti og lodnu knapt helvtin av útflutningsvirðinum á veidda fiskinum.




Kelda: Hagstova Føroya

### Uppisjóvarfiskur og virking

So at siga allur tann uppisjóvarfiskur, sum føroysk skip fiska, verður landaður til føroysku uppisjóvarvirkini. Harumframt verður nakað landað frá útlendskum skipum, serliga svartkjaftur.

Rávørutilgongdin til føroysku uppisjóvarvirkini er tí tengd at kvotunum av uppisjóvarfiski, sum eru tillutaðar føroyskum skipum. Føroysku skipini fiskaðu í 2017 væl meira av sild, nakað meira av makreli, og eisini væl meira av svartkjafti í mun til árið fyri.

Hóast øktu nøgdirnar er samlaða avreiðingarvirðið av uppisjóvarfiski tó nærum óbroytt. Orsøkin er serliga, at miðal avreiðingarprísurin fyri sild er minkaður niður í eina helvt, og at avreiðingarvirðið á svartkjafti eisini er minkað nógv.

Samlaða útflutningsvirðið av uppisjóvarfiski øktist tó við 300 mió. kr. frá 2016 til 2017, helst orsakað av periodiseringum.

### Botnfiskur og virking

Samlaða feskfiskaveiðan hjá føroyskum fiskiskipum hevur aftur í 2017 verið stak vánalig, og rávørutilgongdin til føroysku fiskavirkini hevur av somu orsøk verið avmarkað. Fiskavirkini hava tí aftur í 2017 í stóran mun dúvað á innflutta rávøru, serliga frystan fisk úr Noregi. At tað er neyðugt at keypa rávøru uttanlands og frakta hana til Føroya til virkingar ávirkar likviditetin hjá føroysku fiskavirkjunum negativt, og førir til versnandi vinningsføri.

Samlaðu botnfiskaavreiðingarnar minkaði aftur í 2017 eitt vet í mun til árið fyri. Fiskiskapurin eftir toski og hýsu minkaði við uml. 12 %, meðan ein

glotti var í fiskiskapinum eftir upsa, sum øktist við 9-10 % í mun til árið fyri.

Marknaðarprísirnir á toski og hýsu øktust nakað í 2017 í mun til árið fyri, serliga vóru prísirnir á saltfiski væl hægri enn árið fyri. Hinvegin vóru upsaprísirnir lakari í 2017 enn árið fyri. Miðalprisurin á toski, hýsu og upsa tilsamans var á sama støði í 2017 sum árið fyri.

Avmarkaða rávørutilgongdin sæst aftur á búskaparligu úrslitunum hjá botnfiska-framleiðarunum, har bert einstøk virki hava megnað at fáa eitt avlop á botnlinjuni.

# Útlit

## Uppisjóvarfiskur

Samanumtikið eru útlit til eina munandi lækking í samlaða avreiðingarvirðinum á uppisjóvarfiski í 2018, samanborið við 2017. Orsøkin er serliga minkandi nøgdir av makreli og sild, umframt útlit til nakað lægri prís fyri sildina.

Í mun til 2017 eru útlit til munandi minking í avreiðingunum av makreli. Heildarkvotan er skorin við 20% í 2018 í mun til 2017, og føroyski parturin sambært strandalandaavtaluni er minkaður úr góðum 128 túsund tonsum niður á knapt 103 túsund tons. Tá kvotan, sum verður latin Russlandi, Noregi og Íslandi er trekt frá, eru góð 82 túsund tons at býta millum føroysk skip. Partur av hesum verður útlutaður sum sonevndar menningarkvotur, og partur verður útlutaður við uppboðssølu.

Væntað verður, at makrelprísurin fer at halda sær árið út.

Heildarkvotan av norðhavssild er minkað við einum triðingi, og føroyski parturin, sum verður ásettur eftir avtalu við ES er minkaður úr góðum 125 túsund tonsum niður í 88 túsund tons, harav góð 76 túsund tons verða útlutað til føroysk skip at fiska.

Hóast minkandi nøgdir av norðhavssild, eru ikki útlit til hækkandi prísir á heimsmarknaðinum, bæði orsakað av stórum frystigoymslum, og tí onnur bíligari sildasløg eru í kapping við norðhavssildina og trýsta prísin.

Svartkjaftakvotan er kvinkað uppeftir í 2018 í mun til 2017, sum eisini var eitt gott ár í nøgd. Heildarkvotan fyri 2018 er 1.387 túsund tons, og føroyski parturin er 493 túsund tons í mun til 477 túsund tons í 2017. Svartkjaftaprísurin er minkaður fyrst í 2018, og væntað verður, at 2018-prísirnir á svartkjafti fara at halda sær á verandi støði restina av árinum, møguliga við eitt sindur lækkandi prísum.

## Botnfiskur

Seinastu 10 árini hevur botnfiskiskapurin verið á støði við ringastu kreppuár fyrst í 90'unum, tá samfelagið var í svárari kreppu. Hetta hevur ført til, at Havstovan nú í fleiri ár á rað hevur mælt til at avmarka botnfiskiskapin, so stovnarnir hava møguleika at koma fyri seg aftur. Tilmælini hjá Havstovuni verða tó framvegis bert fylgd í avmarkaðan mun, tá fiskidagar og kvotur verða ásett.

Hóast støðan framvegis ikki er broytt stórvegis, eru tó nakrir glottar at hóma. Úrslitini frá yvirlitstrolingunum hjá Havstovuni í vár benda á, at toska- og hýsustovnarnir eru við at koma fyri seg aftur, eins og nógv nebbasild er at finna í magunum. Eisini er meira av hýsu at fáa á Føroya Banka, tó at bankatoskurin ikki er komin fyri seg enn. Í nýggjastu tilráðingini frá ICES verður víst á, at 2016 og 2017 árgangirnir av toski og hýsu eru yvir miðal, og tilráðingin um fiskiskapin eftir hesum fiskasløgum fyri 2019 hækkar í mun til tilráðingina í fjør. Tó lækkar tilráðingin fyri upsa.

Um hugt verður eftir avreiðingartølunum higartil í ár, er eisini ein lítil bati at hóma. Samlaðu nøgdirnar av vanligu botnfiskasløgunum (toskur, hýsa og upsi) fyrstu fýra mánaðirnar av 2018 vóru nakað hægri enn sama tíðarskeið í 2017. Hóast tølini eru hækkaði eitt vet, er fiskiskapurin framvegis langt undir tí støði, hann var á kring aldarskiftið.

Prísurin á vanligu botnfiskasløgunum væntast at kvinka uppeftir í 2018 í mun til 2017. Prísirnir á saltaðum fiskavørum hava t.d. verið hægri fyrsta kvartal í 2018 í mun til árið fyri.

# *Havbúnaður*

## Gongdin í farna ári

Framleiðslan av laksi frá føroyska havbúnaðinum var í fjør góð 71.000 tons í kruvdari vekt (87.000 tons í rundari vekt), sum er nakað hægri enn í 2016, tá havbúnaðurin framleiddi góð 70.000 tons í kruvdari vekt. Søluvirðið vaks úr 3,7 mia. kr. í 2016 upp í knappar 3,9 mia. kr. í 2017. Hetta merkir samstundis, at føroyskur havbúnaður stendur fyri knapt helvtini av samlaða føroyska fiskavøruútflutninginum, og laksur er greitt tann størsta einstaka útflutningsvøran úr Føroyum.

**Tøka av laksi og sílum (rund vekt) 2004-2017 (1.000 tons)**




| | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Síl | 5,092 | 4,493 | 5,482 | 7,648 | 9,000 | 8,800 | 2,382 | 0,000 | 0,000 | 0,960 | 0,000 | 0,000 | 0,000 | 0,000 |
| Laks | 40,985 | 18,962 | 13,083 | 22,305 | 38,851 | 51,500 | 45,410 | 60,497 | 76,803 | 75,852 | 86,489 | 80,629 | 85,825 | 86,830 |

Kelda: Rúni Dam, sp/f Avrik.

Føroyskur havbúnaður marknaðarførir føroyskan laks sum eina hágóðsku fiskavøru, og prísurin, sum føroyskur laksur fær á marknaðinum, er eisini hægri pr. kg í mun til laksin hjá fremstu kappingarneytunum. Nakrar orsøkir til prísmunin eru, at kundarnar seta prís uppá góðskuna á føroyskum laksi, og at miðalvektin á føroyskum laksi er hægri enn hjá kappingarneytunum.

Seinastu árini er alsamt størri partur av føroyska laksinum seldur til marknaðir uttanfyri Evropa, serliga Russland, USA og Kina. Í 2008 fór uml. 85% av útflutningsvirðinum av aldum laksi til ES, men hesin partur er seinnu árini minkaður so líðandi, og hóast marknaðarparturin til ES er kvinkaður uppeftir í 2017, liggur hann framvegis um tey 35% av samlaða útflutningsvirðinum. Hetta ger tað eisini uppaftur meira umráðandi, at føroysku myndugleikarnir raðfesta arbeiðið við at betra marknaðaratgongdina til hesar nýggju marknaðirnar, so føroysku fyritøkurnar ikki missa kappingarføri av hesum ávum. At hetta er ein reellur vandi sæst m.a. á kinesiska marknaðinum, har bæði Kili og Ísland hava tollfrælsi fyri sínar laksavørur, meðan Noreg er í samráðingum um fríhandilsavtalu við Kina. Føroyar hava framvegis onga handilsavtalu við Kina.

Karmarnir kring framleiðsluna eru annars sum heild góðir, og vinnan hevur seinastu árini havt góð úrslit, tá hugt verður at vøkstri, fóðurfaktori og framleiðslukostnaði. Fellið er eisini á einum lágum støði samanborið við onnur lond, men er tó hækkað nakað seinastu árini. Saman við skynsamari lívfrøðiligari stýring hevur ein óvanliga høgur laksaprísur eisini havt við sær, at feløgini hava havt serliga góð fíggjarlig úrslit í 2017.

Fyritøkurnar hava nýtt týðandi part av úrslitinum til at gera íløgur í útbygging av smoltstøðunum,

nýggj tænastuskip og tól til ikki-medisinska lúsafyribyrging og -viðgerð. Slíkar íløgur eru viðvirkandi til at minka um lívfrøðiliga váðan og kunnu geva møguleikar fyri at økja um framleiðsluna á ein burðardyggan hátt við tað, at smoltini eru størri, áðrenn tey koma í ringarnar.

Laksalúsin er framvegis ein trupulleiki fyri føroyska aling, eins og hon er í laksaframleiðslu kring allan heimin, og eigur trupulleikin framvegis at verða tikin í størsta álvara. Lúsastøðan er higartil í ár frægari, enn hon hevur verið tey seinastu nógvu árini, samstundis sum heilivágsnýtslan er minkað í stórum.

## Útlit

Heimsframleiðslan av laksi veksur í 2018 væntandi uml. 4 % í mun til í fjør. Hesin vøkstur merkir samstundis, at miðalprísurin á laksi í 2018 helst verður eitt sindur lægri enn í 2017. Forward prísirnir á Fish Pool vísa, at prísurin kann væntast at lækka nakað í seinna hálvári í mun til fyrra hálvár í ár.

Tað er ivasamt, hvørja ávirkan høgi laksaprísurin kann fáa á marknaðin uppá longri sikt. Høgi prísurin hevur eisini við sær, at íløgur verða gjørdar í alistøðir á landi, eitt nú í USA. Um framleiðslan á landi fæst at virka eftir ætlan, og vøksturin í útboðnum av laksi frá sjógvalingini framvegis verður avmarkaður, kann hetta eggja til, at fleiri slíkar støðir verða bygdar nærhendis stóru marknaðunum í Asia og Norðuramerika.

Hóast prísurin í løtuni er góður, er tó umráðandi at minnast til, at laksaprísurin søguliga sæð hevur sveiggjað nógv, og tí kunnu aftur koma tíðarskeið, tá tað kann gerast torført at vinna pening á marknaðinum.

Í 2017 vórðu umleið 14,5 mió. laksasmolt sett út í Føroyum. Hetta er minni enn í 2016, tá umleið 16 mió. smolt vórðu sett út. Tó vaks miðalvektin á smoltinum, ið varð sett út, úr 196 g í 2016 upp í 246 g í 2017.

Væntandi minkar tøkan hjá føroysku alifyritøkunum nakað í 2018 í mun til 2017.

# *Handverksvinnan*

## Gongdin í byggivinnuni

### Innflutningurin av byggitilfari

Myndin niðanfyri vísir innflutningin av tilfari og lutum til byggivinnuna síðani 2004. Eftir at innfluttningurin av byggitilfari javnaði seg nakað í 2015, var vøksturin í 2016 og nú aftur í 2017 rættuliga stórur. Í 2017 varð innflutt fyri 689 mió kr., sum er munandi hægri enn í 2007.




Kelda: Hagstova Føroya

## Talið á nýbyggingum

Ein fullfíggjað sethúsa- ella bygningsskráseting er ikki til. Verða skrásetingarnar hjá SEV viðvíkjandi gjøldum fyri (ný)íbindingar í elkervið nýttar, sæst, at tað eru vorðin bygd munandi færri sethús hesi seinstu árini, í mun til fyri 10 árum síðani, tó at tað kvinkar nakað uppeftir aftur nú. Fleiri stórar byggiverkætlanir eru í gongd, umframt at fleiri aktørar – bæði Bústaðir og privatar fyritøkur - eru farnir undir íbúðarbygging.




Kelda: Hagstova Føroya

## Útlit fyri handverksvinnuna

Útlitini hjá byggivinnuni fyri 2018 eru áleið tey somu sum árið undan. Fleiri stórar verkætlanir eru í gongd, so sum havnaútbyggingin í Tórshavn, Skúlin á Fløtum, Tórshavnar Musikskúli og miðbýarøkið í Klaksvík. Eisini arbeiða fleiri kommunur við útstykkingum bæði til privat og vinnu. Tað hevur stóran týdning fyri bæði samfelag og vinnu, at verkætlanir verða planlagdar soleiðis, at vinnan veit, hvat er í væntu, og tí kann fyrireika seg uppá tað, sum kemur.

Føroya Handverksmeistarafelag hevur seinastu árini sett fleiri átøk í verk fyri at økja um lærlingatilgongdina. Flestu av átøkunum eru rættað móti fólkaskúlanum og ungdómi sum heild, við tí fyri eyga at kunna um starvsmøguleikar sum handverkari og yrkislærd.

Umframt FM fyri handverkslærlingar var eisini skipað fyri øðrum átøkum til frama fyri at økja um lærlingatalið. M.a. eru tveir bóklingar framleiddir til fólkaskúlan. Annar er eitt roknihefti, sum fylgir einari skúlastovu og vísir, hvussu ymiskir handverkarar hava verið við til at bygt hana. Hin bóklingurin skipar skúlavitjanir á byggiplássum. Eisini hevur verið fyriskipað tiltak fyri 8. floksnæmingum í Tórshavn og Klaksvík, har tey hoyra fleiri ymisk yrkislærd fólk greiða frá um starvsmøguleikar innan yrkið.

Í 2016 setti landstýriskvinnan í mentamálum gongd á at endurskoða yrkisútbúgvingarskipanina. Serliga eru tvey mál, sum Føroya Handverksmeistarafelag heldur verða átrokandi at fáa broytt. Tað fyrsta er, at annað skúlaskeið verður býtt í helvt, soleiðis at lærlingarnir eru tvær ferðir 10 vikur í skúla, heldur enn 20 vikur út í eitt. Seinna alneyðuga broytingin er, at teknisku skúlarnir eiga at hava møguleika at taka lærlingarnar inn á skúlan tvær ferðir árliga. Hetta er neyðugt, soleiðis at fyritøkur, sum hava fleiri lærlingar, ikki skulu vera av við allar lærlingarnar samstundis. Málið liggur framvegis í Mentamálaráðnum.

Hóast kvassar atfinningar játtaði Løgtingið 7. mió kr. til eitt sokallað tunnilslið undir Landsverki, sum skal bora nakrar metrar av tunli um árið. Hetta er skilaleyst oysl av almennum peningin og als ikki í trá við skilagóðan vinnupolitikk. Tunnilsliðið kemur afturat øðrum virksemi hjá Landsverk, sum vinnan kundi loyst, so sum viðlíkahald av landsvegum og tunlum, fresing og asfaltering, vetrarhald á landsvegunum, umframt framleiðslu og sølu av gróti, skervi og asfalti. Vinnan hevur ta greiðu fatan, at jú meira av entreprenørvirkseminum hjá Landsverk verður útveitt, jú fleiri fyritøkur hava møguleikan at sleppa framat, sum eisini eggjar til at nýggjar fyritøkur kunnu spíra. Hetta er gott fyri kappingina og samstundis fyri kostnaðarstøðið á tí arbeiði, sum verður bjóðað út.

## Shippingvinnan

Føroyski handilsskipaflotin telur nú knapt 100 skip og 350.000 BT. Mett verður, at vinnugreinin umsetur fyri einar 2 milliardir árliga, og varliga kann verða mett, at umleið helmingurin av hesum er frá útflutningi. Shippingvinnan er tí ein rættuliga týdningarmikil partur av føroyska búskapinum.

Sum sæst á stabbamyndini niðanfyri, eru eini 1650 fólk tengd at shippingvinnuni. Á sjónum er talan um útvið 1350 sjófólk. Av hesum eru umleið 600 føroyingar, knapt 400 úr hinum norðanlondunum og umleið 350 aðrastaðni frá. Eisini á landi er rættuliga fitt av starvsfólki, sum eru tengd at vinnugreinini. Mett verður, at útvið 300 fólk á landi hava sín vinnuveg í reiðaríi innan vinnugreinina.




Kelda: Reiðarafelagið fyri Farmaskip

Shippingvinnan er ein av teimum sterku vinnugreinunum, sum er við til at gera mótstøðuførið hjá føroyska samfelagnum og búskapinum størri.

Henda vinnugrein er ikki einans tengd at samfelagsgongdini í Føroyum, men heldur at gongdini í heimsbúskapinum. Hetta merkir, at serliga stóru konjunktursveiggini, sum eyðkenna føroyska búskapin, verða javnað við eini slíkari vinnugrein.

Shippingvinnan hevur tørv á førleikum, sum føroyingar vanliga eru sterkir í. Her verður hugsað um vanligar førleikar innan sjóvinnu og sjóvinnuumsiting. Men harafturat hevur shippingvinnan eisini tørv á førleikum, sum eru serligir fyri shippingvinnuna, og sum eru lutfalsliga nýggir í Føroyum. Fleiri og fleiri føroyingar hava nú hesar førleikar, og hetta er eisini við til at hækka førleikarnar á føroyska arbeiðsmarknaðinum yvirhøvur og eisini innan almennu umsitingina.

Grundarlag verður fyri nýggjum útbúgvingum, skeiðstilboðum o.l. í Føroyum, og hetta kann við tíðini gerast eitt áhugavert tilboð bæði til føroyingar, sum kanska annars høvdu leitað sær út um landoddarnar at nema sær kunnleika, men eisini til útlendingar, sum velja at koma hendanvegin at fáa sær útbúgving.

## Útlit

Eitt av málunum í Sjóvinnupolitikkinum frá 2017 er, at Føroyar liva upp til altjóða lóggávu, og at vit eru við, har avgerðirnar verða tiknar. Serliga verður Paris MoU (Paris Memorandum of Understanding) nevnt, og á fíggjarlógini fyri í ár eru longu pengar játtaðir til, at Føroyar verða partur av Paris MoU. Hetta er avgjørt eitt framstig.

Endamálið við Paris MoU er við skipaðum havnaeftirliti at sleppa av við undirmálsskip (substandard ships), og føroyskir myndugleikar verða sostatt partur av eini skipan, har atburður og góðska hjá skipum verða eftirhugt og tryggjað. Hetta er at fegnast um.

Vinnugreinin hevur tó og fer í komandi tíðum at hava avbjóðingar við at fáa nokk av fólki at manna skipini. Serliga eru tað fulltiknir dekkarar, sum tørvur er á. Tað eru ikki nóg nógvir føroyingar, sum í løtuni hava hesar førleikar, og tí er alneyðugt, at viðkomandi partar leggja seg eftir at fáa fleiri føroyingar at útbúgva seg til fulltiknar dekkarar. Hóast tørvurin á útlendingum altíð er til staðar, er hann í løtuni óvanliga stórur, orsakað av ov fáum føroyskum fulltiknum dekkarum.

Vinnan hevur avgjørt áhuga í so nógvum føroyskum dekkarum, sum gjørligt, men tað er harafturat týdningarmikið, at vinnan hevur tilgongd av útlendingum til kappingarførar treytir. Fakfelagsavbjóðingar hava tó gjørt hetta so mikið trupult, at vandi er fyri, at reiðaríini orsakað av væntandi kappingarføri fara at standa seg betri undir øðrum flaggi.

Ein onnur avbjóðing hjá altjóða handilsskipaflotanum eru nýggju alheims IMO krøvini, galdandi frá 1. januar 2020, um í mesta lagi 0,5 % svávul í brennievni til skip. International Chamber of Shipping ávarar beinleiðis ímóti ruðuleika, tí at tað eru ov nógvar ógreiðir í sambandi við gildiskomuna av nýggju krøvunum. Verða hesi ikki loyst, fer hetta at hindra flutningi

av heimsins orku, rávørum og framleiddum vørum – 90 % av heimshandlinum verður fluttur sjóvegis.

Tað er áhaldandi ógvuliga týdningarmikið, at føroyska flaggið varðveitir kappingarførið, og hetta eiga avvarandi myndugleikar at hava sum eitt mál í sjálvum sær. Um kósin við FAS verður hildin, og framhaldandi rætt verður farið fram, verður shippingvinnan í komandi árum uttan iva í enn størri mun við til at styrkja føroyska samfelagið, bæði reint búskaparliga, men eisini í mun til t.d. førleikar hjá fólki og møguleikan hjá fólki at støðast.

Sum sagt verður í visjónini í Sjóvinnupolitikkinum 2017: "Føroysk shippingvinna skal verða ein týðandi leikari í altjóða høpi, sum skapar avkast, framburð og vælferð."

## *Oljuvinnan*

Einki leitivirksemi hevur verið á føroyskum øki síðani 2014, og seinastu loyvini vórðu latin inn aftur í 2016. Í mai 2017 lat fjórða útbjóðingarumfar upp, og hetta var opið í 9 mánaðir. Tá umfarið lat aftur, hevði bert eitt felag latið inn umsókn at leita eftir kolvetni í føroysku undirgrundini. Hetta felagið tók eftirfylgjandi umsóknina aftur, og sostatt var ongin umsøkjari til fjórðu útbjóðingarrunduna.

Lági oljuprísurin hevur aftur í 2017 ávirka virksemið innan frálandavinnuna, og føroyska veitaravinnan arbeiðir miðvíst við at selja tænastur og veitingar til olju- og sjóvinnuna uttanfyri føroysku landoddarnir. Seinastu árini hevur Oljuvinnufelagið arbeitt við tiltøkum, sum staðseta Føroyar sum ein tænastudepil fyri frálandavinnuna og skipaferðslu, sum siglir framvið á okkara leiðum. Hetta sermerkti eisini 2017, har oljuvinnufelagið saman við Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum lat gera eina frágreiðing um sjóvinnuveitingar og lýsingarfilmin "Children of the Sea".

Í 2017 varð avgjørt, at føroyskur landabásur ikki skuldi vera á Offshore Europe. Orsøkin til hetta var ov lítil undirtøka millum føroyskar fyritøkur, og tískil var ikki mett ráðiligt at luttaka við landabási á oljumessuni í Aberdeen.

## *KT-vinnan*

Seinasta árið hevur verið eitt spennandi ár í KT-vinnuni. KT-vinnan er í vøkstri og eftirspurningurin eftir KT-tænastum eru øktar. Tøknin verður alt meira ein sjónligur partur í dagligdegnum, og Føroyar eru sum heild í eini tilgongd at venda sær móti eini talgildari framtíð.

Í 2014/2015 settu mynduleikarnir á skrá eitt arbeiði við at taliglda Føroyar og arbeiða fyri einum talgildum samleika, rudda upp í ymsum grundskráum, so stovnar og virkir ikki nýtast at viðlíkahalda teirra egnu skráir, og at gera tað einfaldari og betri hjá borgarum og virkjum at avgreiða teirra viðurskifti við tað almenna umvegis portalar og aðrar líknandi loysnir. Hetta arbeiðið er nú farið ígongd og opnar fyri nýggjum møguleikum í KT-vinnuni.

Í fjør lat KT-felagið gera eina kanning av, hvussu nógv ársverk eru í KT-vinnuni, og niðurstøðan frá kanningini var m.a., at tað nú eru fleiri fólk tilknýtt KT-vinnuni, enn roknað varð við. Yvir 600 ársverk arbeiða við KT, harav umleið 20 % av ársverkunum eru at finna í almenna geiranum, og hini 80 % eru í privata geiranum.

Eitt afturvendandi evni, sum KT-felagið fæst við, er, at tað miðvíst verður arbeitt við at fáa føroyskar fyritøkur og stovnar at velja føroyskar KT-loysnir, sum eru snikkaðar til føroyska marknaðin. Hetta verður gjørt við bæði at vísa á góðu søgurnar um væleydnaðar føroyskt framleiddar skipanir og, tá almenn útboð eru umvegis innkeypsportalin, við at fylgja við og minna á, at útbjóðingartilfarið vendir sær til føroysku KT-vinnuna. Sum heild gongur rætta vegin við hesum, hóast vit av og á síggja útbjóðingartilfar á útlendskum máli.

Tað er einki at ivast í, at spennandi tíðir eru fyri framman fyri KT-vinnuna. Hvussu væl fer at ganga, er tengt at, hvussu væl vit duga at brúka KT-førleikarnir, sum eru, umframt hvussu vit styrkja KT-útbúgvingina í Føroyum.

Ein fortreyt fyri øktum virksemi í KT vinnuni er, at røttu førleikarnir eru tøkir til vinnuna. Fyri at stuðla undir KT-útbúgving í Føroyum, hevur KT-vinnan tikið upp samskifti við útbúgvingarstovnar á bæði miðnám og Fróðskaparsetrið og fylgir gongdini har.

## Samskiftisvinnan

Samskiftis- og lýsingarvinnan hevur seinastu árini merkt støðugt vaksandi virksemi og framgongd.

Tað eru tveir stórir veitarar á marknaðinum saman við einum støðugum talið av smærri veitarum – í fleiri førum einstaklingavirkir.

Vegna vantandi hagtalsgrundarlag er torført at vísa á ein ítøkiligan vøkstur ella fall í vinnugreinini, men afturmeldingar frá vinnuni eru, at talan er um ein størri eftirspurning í 2017 samanborið við undanfarnu árini.

Eisini gera aktørar í vinnuni alsamt meira um seg uttanfyri landoddarnar. Hetta er prógv uppá høga støðið í vinnuni.

Útlitini fyri samskiftis- og lýsingarvinnuni fyri 2018 eru sum heild góð.

## Ráðgevaravinnan

Nógv virksemi er í byggivinnuni, og merkist tað eisini í ráðgevaravinnuni. Seinastu árini hevur talið av ráðgevaravirkjum og starvsfólkum í vinnuni í Føroyum verið vaksandi, og ber hetta boð um vaksandi eftirspurning eftir ráðgevaratænastum.

Føroyska ráðgevaravinnan hevur drúgvar royndir og breiða vitan um øll sløg av arbeiðum, sum tørvur er á at fáa gjørt í Føroyum. Strembað verður eftir, at hetta eisini í framtíðini verður so, tí fyrimunirnir eru nógvir.

Í fyrsta lagi verða vitanarstørv varðveitt í landinum, og í øðrum lagi er ráðgevingin smidligari, tá hon verður veitt í nærumhvørvinum. Í triðja lagi eru føroysku tímatakstirnir lægri enn í grannalondunum. Harafturat kemur, at føroyska samfelagið hevur stórt gagn av, at vitanin um at byggja bygningar og aðra nýgerð eftir føroyskum fortreytum verður varðveitt og ment her á landi.

Tað verður áhaldandi arbeitt við at ávirka soleiðis, at føroyskar ráðgevarafyritøkur fáa javnbjóðis atgongd til allar føroyskar verkætlanir. Arbeitt verður eisini fyri at fáa gjøgnumskygni í sambandi við tilluting og døming av útboðum. Smáir batar hava verið at sæð, men enn manglar nakað, áðrenn støðan er nøktandi.

Ráðgevaravinnan arbeiðir miðvíst við førleikamenning og seinasta árið hevur m.a. bygningskunngerðin verið á skránni. Somuleiðis verður arbeitt saman við Byggiharrasamtakinum og Føroya Handverksmeistarafelag at fáa gjørt vegleiðingar til byggivinnuna, m.a. felagstreytir og HTU.

## Handilsvinnan

Innflutningstølini eru samlað sæð vaksin rættiliga støðugt seinastu árini. Tó er vøksturin hóvligur í mun til, hvussu góðar tíðirnar eru í løtuni. Sambært Búskaparráðnum er nýtslukvotan hjá føroysku húsarhaldunum als ikki komin aftur á tað støðið, sum hon var á undan fíggjarkreppuni. Hildið verður, at fólk heldur leggja tøka pening sín til síðis enn at brúka hann til privata nýtslu.

Innflutningurin av matvørum og øðrum ódrúgvum vørum hevur verið støðugt vaksandi síðani 2011. Tað vísir seg, at hesin innflutningurin í stóran mun fylgir gongdini í lønarútgjaldingunum.

Innflutningurin av hálvdrúgvum nýtsluvørum er eisini sum heild vaksin í mun til 2016. Innflutningurin av klæðum er vaksin við góðum fýra prosentum og aðrar hálvdrúgvar vørur við 19%. Serliga lágur vøkstur er tó framhaldandi í fótbúnaði, sum einans er vaksin við einum einum góðum hálvum prosenti í mun til 2016.

Stórsti vøksturin síðani fíggjarkreppuna er at síggja í hálvdrúgvu og drúgvu vørunum. Eisini í ár er innflutningurin av drúgvum nýtsluvørum vaksin. Vøksturin á innflutninginum av persónbilum er tó minkaður niður á 3,4 % samanborið við 11,1 % í 2016. Stórur vøkstur er tó at síggja á innflutninginum av vinnubilum.

Sølan av bilum gevur vanliga eina ábending um, hvussu búskapurin hevur tað, og um vanligi brúkarin hevur álit á framtíðina. Skrásetingin av nýggjum bilum í 2017 er tó bert vaksin við 2,3 % í mun til 2016. Vøksturin hevur verið stórur seinastu árini, so tað kann hugsast, at tey, sum leingi hava ætlað at keypt sær nýggjan bil, nú hava gjørt tað. Tað er eisini møguligt, at brúkarin ikki er eins bjartskygdur um fíggjarligu framtíðarstøðuna, sum hann hevur verið undanfarin ár.

Handilsvinnan er saman við øðrum vinnum í eini skiftistíð, har talgildingin krevur, at íløgur skulu gerast í tøkniliga menning. Tað er týdningarmikið

at eggja verður til, at nýggj tøkni verður brúkt og samstundis at syrgja fyri, at somu reglur eru galdandi fyri øll á marknaðinum.

Í løtuni ber til hjá útlendskum fyritøkum at senda pakkar við einum virði á undir 300 kr. til Føroya, har tað slepst undan hjá móttakaranum at rinda toll og MVG í Føroyum. Tøl fáast ikki til vega fyri henda innflutning í Føroyum, men tøl úr øðrum londum vísa, at talið á hesum pakkum, sum serliga koma úr fjareystri, økist skjótt. Talan er um mistar inntøkur til landið og mistar inntøkur til handilsvinnuna. Fyri føroysku handilsvinnuna eru hesar marknaðartreytir kappingaravlagandi, og tær hava ikki sín líka í londum, sum vit vanliga samanbera okkum við, har smálutamarkið liggur væl lægri enn í Føroyum.

## *Ferðavinnan*

Tá ið hugt verður at gongdini í ferðavinnuni, er vanligt at fylgja gistingarnáttunum í vinnuni. Í 2017 vóru 159.759 gistingarnætur skrásettar kring landið, og er talan um ein vøkstur á 9 % í mun til árið fyri. Harafturat koma privatar gistingar, sum serliga eru bílagdar gjøgnum AirBnB, sum ikki vil lata sínar upplýsingar víðari, og sum tískil ikki verða skrásettar í hagtølunum. Metingin er, at hesar gistingar eru í vøkstri.




Kelda: Hagstova Føroya

Seinastu árini hava gistingarhús bygt út, nýggj eru bygd, umframt at ítøkiligar ætlanir eru um at byggja enn fleiri gistingarhús. Hetta merkir, at alsamt fleiri kømur eru løgd afturat, og at nógv fleiri eru í væntu. Hóast vøkstur í ferðavinnuni er tað framvegis ein avbjóðing at fylla gistingarhúsini uttan fyri háárstíð. Um vit hyggja at gistingum á gistingarhúsum sæst, at slakastu mánaðirnir eru januar, februar og desember. Um gongdin í 2017 verður samanborin við gongdina í 2013 sæst, at talan er um fleiri gistingar, og at ferðavinnuárið er longt, nú tað byrjar fyrr og endar seinni á árinum enn áður.




Kelda: Hagstova Føroya

Ferðafólkaflutningurin til Føroya heldur fram at vaksa. Talvan til høgru telur bæði føroyingar og útlendingar. Síðst í mars mánaði í fjør fór SAS at flúgva til Føroya. Vøksturin á komum til Føroya vaks í fjør við góðum 13 % í mun til 6 % í 2016.

Hagstova Føroya kannar búskaparliga týdningin av føroysku ferðavinnuni. Sambært hesum tølum, sum tó bert eru tøk til og við 2016, var umsetningurin til útlendsk ferðandi í 2016 606 mió. kr. Hóast ivamál er um tølini av ársverkum, verða tey mett at verða 607 í tali sama ár.




Kelda: Hagstova Føroya

## Ídnaðarvinnan

Føroysk ídnaðarframleiðsla er eyðkend við einum ella fáum fyritøkum av sama slagi. Her er t.d. talan um matvøruframleiðslu, framleiðslu av reingerðarevnum, bryggjarí og prentsmiðjur.

Felags fyri fyritøkurnar er, at tær virka í stórari kapping við líknandi vørur frá øðrum marknaðum. Tað sær tó út til, at føroysku fyritøkurnar hava ein lutfalsligan støðugan og stóran marknaðarpart í Føroyum, og hetta er at fegnast um.

Rákið at keypa lokalar og upprunaligar vørur saman við góðu tíðunum, vit síggja í føroyska samfelagnum í løtuni, er komið flestu av hesum fyritøkum til góðar.

Tað er tó ongin loyna, at tá tað til ídnaðarvørur kemur, eru fyritøkurnar undir sera stórum kappingartrýsti frá útlendskum vørum. Framgongdin í samfelagnum annars kemur kanska nakað seinni og í minni mun til hesar fyritøkurnar enn fyritøkur í øðrum vinnugreinum.

## Um Føroya Arbeiðsgevarafelag, Vinnuhúsið og feløgini annars

Føroya Arbeiðsgevarafelag er meginfelag fyri føroyskar arbeiðsgevarar. Felagið arbeiðir fyri, at føroyskt vinnulív hevur teir bestu møguleikarnar at kappast, mennast og virka. Við samráðingum og sáttmálum tryggjar Arbeiðsgevarafelagið samstundis góðar og støðugar arbeiðsmarknaðar-karmar fyri vinnuna.

Í Føroya Arbeiðsgevarafelag eru føroyskar fyritøkur umframt arbeiðsgevarasamskipanir limir. Arbeiðsgevarasamskipanirnar, sum eru limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag, eru Føroya Handverks-meistarafelag, Føroya Prentsmiðjufelag, Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum og Reiðarafelagið fyri Farmaskip. Fyritøkur, sum ikki hoyra til virkisøkini hjá teimum fýra feløgunum, sum eru nevnd omanfyri, hava beinleiðis limaskap í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

**Endamálið hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag:**

- **Felags sáttmálar fyri vinnuna:** Vegna vinnuna ger Arbeiðsgevarafelagið sáttmálar við løntakarafeløgini. Hesir tryggja støðug viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum og tálma lønarvøkstri í mestan mun.
- **Ráðgeving og tænasta:** Felagið veitir limum sínum ráðgeving og tænastur á ymiskum økjum: starvsfólkaviðurskifti og leiðsla, lønarsáttmálar, lógir og reglu-gerðir á vinnuøkinum v.m. Harumframt virkar umsitingin hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag í Vinnuhúsinum sum sambindingarlið við vinnu í øðrum londum, partvíst gjøgnum samstarv okkara við vinnufeløg í grannalondunum, og partvíst tí at útlendsk feløg, sum vilja samstarva við føroyska vinnu, venda sær til felagið.
- **Politisk ávirkan:** Vinnunar vegna verður arbeitt við at ávirka allar tær lógir og reglugerðir, sum landsstýri, løgting, umsiting, stovnar og kommunur seta í verk, soleiðis at hesar tæna og ikki darva vinnuni. Talan er her um yvirskipaðar vinnupolitiskar karmar, men ikki serstakar karmar fyri ávísar vinnugreinar. Arbeiðsgevarafeløgini eru umboðað í nógvum ymiskum stýrum, nevndum og ráðum, ið seta karmar fyri føroyska vinnu. Her gera feløgini sína ávirkan galdandi, so vinnusjónarmið vinna frama. Hettar tryggjar limum okkara, at tað eisini framyvir gerst liviligt hjá fólki við fyritakssemi og hugskotum. Feløgini gera sostatt alt fyri at ávirka skipanir, sum eru viðkomandi fyri vinnuna.
- **Kunning:** Føroya Arbeiðsgevarafelag veitir kunning um privatu vinnuna, vinnulig viðurskiftir og tann týdning, vinnan hevur fyri samfelagið, bæði úteftir og gjøgnum føroyskar miðlar. Felagið skipar eisini fyri kunningartiltøkum fyri limunum. Hetta snýr seg í mestan mun um broytingar í lóggávu, sáttmálum o.l.
- **Fundir og orðaskifti** í vinnuni: Føroya Arbeiðsgevarafelag nýtir Vinnuhúsið sum miðdepil fyri vinnuligum og vinnupolitiskum orðaskifti, og har verða bond knýtt millum leiðarar í privatu vinnunu, eisini tá Vinnuhúsið er karmur um vitjanir uttaneftir. Arbeiðsgevarafelagið setur eisini eftir tørvi arbeiðsbólkar at greina mál og stevnur fyri føroyska vinnu; mál og stevnur, sum ofta gerast hornasteinar í almenna vinnupolitikkinum hjá felagnum.

Lógir Føroya Arbeiðsgevarafelags og onnur kunning um felagið og Vinnuhúsið er lýst nærri á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo.

Nevnd Føroya Arbeiðsgevarafelags verður vald á árliga aðalfundinum. Í lógunum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur, at nevndin skal veljast soleiðis, at hon umboðar tær ymisku vinnugreinarnar og landið, so væl sum til ber.

Føroya Arbeiðsgevarafelag eigur Vinnuhúsið saman við Havnar Handverksmeistarafelag. Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur fyri rakstrinum av Vinnuhúsinum og bjóðar vinnugreinafeløgum at húsast í húsinum. Vinnuhúsið er felags marknaðarføringsheitið á virkseminum hjá arbeiðsgevarafeløgunum og vinnugreina-feløgunum í Vinnuhúsinum.

## Hvør húsast í Vinnuhúsinum?

Í dag eru 14 virkin feløg undir sama taki í Vinnuhúsinum. Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur ta hugsan, at tað hevur týdning at savna føroyska vinnuna. Hetta fyri, at føroyska vinnan skal hava sterkari samleika í samfelagnum gjøgnum felags umboðan.

**Arbeiðsgevarafeløgini eru:**

| Arbeiðsgevarafeløg | Ábyrgd |
|---|---|
| Føroya Arbeiðsgevarafelag | Marita Rasmussen |
| Føroya Handverksmeistarafelag | Marius Thomassen |
| Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum | Jórun Gardar |
| Føroya Prentsmiðjufelag | Jórun Gardar |
| Reiðarafelagið fyri Farmaskip | Esther Dahl |

Høvuðsuppgávan hjá arbeiðsgevarafeløgunum er at føra sáttmálasamráðingar við fakfeløgini vegna limirnar og at ráðgeva limunum í sáttmála og arbeiðsmarknaðarspurningum.

Harafturat arbeiða arbeiðsgevarafeløgini eisini við arbeiðsmarknaðarmálum og yvirskipaðum vinnukørmum.

**Vinnugreinafeløgini eru:**

| Vinnugreinafeløg | Ábyrgd |
|---|---|
| Havnar Handverksmeistarafelag | Marius Thomasen |
| Havbúnaðarfelagið | Niels Winther |
| Føroya Ráfiskakeyparafelag | Niels Winther |
| Handilsvinnufelagið | Birita Johansen |
| KT-felagið | Marius Thomassen |
| Oljuvinnufelagið | Jórun Gardar |
| Samskifti | Marius Thomassen |
| Ráðgevarafelagið | Marita Rasmussen |
| Ferðavinnufelagið | Birita Johansen |

Vinnugreinafeløgini fáast við spurningar, ið eru viðkomandi fyri teirra vinnugrein.

Vinnugreinafeløgini arbeiða sjálvstøðugt við sínum málum.

Størri mál, sum viðkoma fleiri vinnugreinum ella allari vinnuni, verða samskipað av umsitingini í Vinnuhúsinum og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Vinnugreinafeløgini hava ikki ábyrgd av sáttmálasamráðingum.

### Føroya Reiðarafelagið og Felagið Nótaskip

Føroya Reiðarafelag og Felagið Nótaskip leiga skrivstovu í Vinnuhúsinum. Feløgini eru ikki limir í Føroya Arbeiðsgevarfelag ella partar av Vinnuhúsinum annars.

# Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag

Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag setur karmarnar um arbeiðið í Vinnuhúsinum.

Í nevndini sita:



## Bogi Jacobsen, formaður

Bogi Jacobsen er stjóri í framleiðslu og útflutnings-fyritøkuni Varðin Pelagic. Harumframt er Bogi Jacobsen nevndarlimur í P/F Varðin og P/F Fossá. Bogi Jacobsen hevur sitið sum nevndarlimur í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2014 og sum formaður síðan 2017.



## Høgni Hansen, næstformaður

Høgni Hansen er stjóri í heilsøluni Poul Hansen. Høgni Hansen er nevndar-limur í fyritøkum, umframt at hann eisini var nevndarlimur í Havnar Arbeiðsgevarafelag, áðrenn felagið varð avtikið. Høgni Hansen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2011 og sum næstformaður felagsins síðan tá.



## Kristoffur Laksá, nevndarlimur

Kristoffur Laksá er samráðingarleiðari Føroya Arbeiðsgevarafelags. Hann er eisini nevndarlimur í føroyskum fyritøkum og sat í nógv ár í nevndini í Føroya Prentsmiðjufelag. Kristoffur Laksá hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 1993.



## Jón Sigurdsson, nevndarlimur

Jón Sigurdsson er stjóri og stovnari av byggifyritøkuni Articon. Umframt at hava verið nevndarlimur í Føroya Handverksmeistarafelag og Havnar Handverksmeistarafelag í mong ár er hann eisini nevndarlimur í øðrum føroyskum fyritøkum. Jón Sigurdsson hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2004.

## Atli Gregersen, nevndarlimur



Atli Gregersen er stjóri í alifyritøkuni Luna. Atli Gregersen er eisini nevndarlimur í Havbúnaðar-felagnum. Atli Gregersen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2011.



## Fróði Magnussen, nevndarlimur

Fróði Magnussen er stjóri á KT-fyritøkuni Formula. Fróði Magnussen hevur verið formaður í KT-felagnum og er framvegis nevndarlimur har, umframt at vera nevndarlimur í øðrum fyritøkum. Fróði Magnussen hevur sitið í nevndini fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2014.



## Jens Meinhard Rasmussen, nevndarlimur

Jens Meinhard Rasmussen er stjóri í Skansi. Jens Meinhard Rasmussen er formaður í Reiðarafelagnum fyri Farmaskip og nevndarlimur í International Chamber of Shipping. Jens Meinhard Rasmussen hevur sitið sum nevndarlimur í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2017.



## Árni Ellefsen, nevndarlimur

Árni Ellefsen er stjóri í BankNordik. Árni Ellefsen er formaður í Arbeiðsgevarafelagnum hjá Fíggjarstovnum í Føroyum umframt nevndarlimur í øðrum fyritøkum. Árni Ellefsen hevur sitið sum nevndarlimur í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2017.



## Odd Eliasen, nevndarlimur

Odd Eliasen er stjóri í Havsbrún og partur av samtaksleiðsluni í Bakkafrost. Odd Eliasen hevur sitið sum nevndarlimur í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2017.